# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2008

## Frágreiðing
## um frávik millum játtan og nýtslu o.a.

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
"um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

SEPTEMBER 2009

## Innihaldsyvirlit

**0 INNGANGUR 7**

**1 FORMLIG VIÐURSKIFTI 9**

**1.1 JÁTTANARVIÐURSKIFTI 9**
1.1.1 FÍGGJARLÓGIN 9
1.1.2 FÍGGJARNEVNDARSKJØL 9
1.1.3 EYKAJÁTTANIR 9
1.1.4 EYKAJÁTTANARLÓG NOVEMBER 2008-2 9
**1.2 GÓÐKENNING AV ROKNSKAPINUM 11**
1.2.1 MÁNAÐARROKNSKAPURIN 11
1.2.2 ÁRSROKNSKAPURIN 12
**1.3 ÓGREIÐA UM VERKLAGSLÓGIR 13**

**2 LØGMANSFYRISITINGIN 15**

**2.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 15**
2.1.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.12 15
2.1.2 LØGMAÐUR OG LANDSSTÝRIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 2.12.3.01. 16
**2.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 17**
2.2.1 UMBYGGING Í TINGANESI (LØGUJÁTTAN) 2.11.1.21. 17

**3 FÍGGJARMÁL 19**

**3.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 19**
3.1.1 SØLA AV PARTABRØVUM Í P/F ELEKTRON 3.11.1.46. 19
3.1.2 TAKS (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.04. 19
3.1.3 EFTIRLØN LANDSSTÝRISMANNA (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.18.2.07. 20
3.1.4 EFTIRLØNIR INNAN HEILSUVERKIÐ (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.20.3.17. 20
3.1.5 STUÐUL TIL FLUTNING OG DUPULT HÚSARHALD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.2.01. 20
3.1.6 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.01. 20
3.1.7 LÆRARAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.23.2.07. 21
3.1.8 KT-FYRISITING (RAKSTRARJÁTTAN) 3.38.3.19. 21
**3.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 22**
3.2.1 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.03. 22
3.2.2 SÁTTMÁLAVIÐURSKIFTI (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.36. 22
3.2.3 BÚSKAPARRÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.13. 22
3.2.4 UMSITING AV OGN OG SKULD LANDSINS (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.23. 22
3.2.5 ÚTGJALD ÚR TRYGDARGRUNNINUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.7.10. 22
3.2.6 STUÐUL TIL BYGGING OG UMVÆLING AV EGNUM BÚSTAÐI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.04. 23
3.2.7 FAS-ENDURGJALD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.35.1.05. 23
**3.3 RENTUR/FRÁVIK 23**
3.3.1 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1. 23
3.3.2 MILLUMVERANDI VIÐ TJÓÐBANKAN OG LANDSBANKAN 20.50.2. 23
**3.4 INNTØKUR/FRÁVIK 24**
3.4.1 SKATTAINNTØKUR 20.52.1. 24

3.4.2 AVGJØLD OG TOLLUR 20.52.2. 25
3.4.3 YMISKAR INNTØKUR 20.52.3. 25
3.4.4 AÐRAR INNTØKUR 20.52.3.10. 26
3.4.5 HEILDARVEITING O.T. 20.54.1. 26
3.4.6 ÚTLÁN 53.15.5. 27
**3.5 AÐRAR VIÐMERKINGAR 27**
3.5.1 ÓGREIÐA UM JÁTTANIR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD 27
3.5.2 FYRISITINGARÚTREIÐSLUR VERÐA SPJADDAR 27
3.5.3 ENDURRINDAN AV TÆNASTUMANNAEFTIRLØNUM 28

**4 FISKIVINNUMÁL 29**

**4.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 29**
4.1.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.15. 29
4.1.2 ALMENN JØRÐ, SØLA (LØGUJÁTTAN) 5.33.2.11. 29
4.1.3 FISKIVINNURÁÐ OG NEVNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.01. 30
4.1.4 UPPLÝSING UM GRIND (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.04. 30
4.1.5 FISKIRANNSÓKNARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.01. 30
4.1.6 MAGNUS HEINASON (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.04. 31
4.1.7 INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.01. 31
4.1.8 FISKIVINNUMENNING Á LANDI 5.34.4.16. 31
4.1.9 ÚTLÁN 5.34.5.01. 32
4.1.10 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR 5.34.5.07. 32
**4.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 33**
4.2.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.05. 33
4.2.2 GRANSKINGARÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.34. 33
4.2.3 INNSAVNAN AV ULL OG SKINNUM 5.33.2.02. 33
4.2.4 LØNJAVNINGARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.10. 33
4.2.5 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.2.01. 33
4.2.6 NÝTT HAVRANNSÓKNARSKIP (LØGUJÁTTAN) 5.34.3.06 34
4.2.7 SJÚKRATRYGD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.04. 34

**5 VINNUMÁL 35**

**5.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 35**
5.1.1 UMBYGGING AV HEILSUFRØÐILIGU STARVSSTOVUNI (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.05. 35
5.1.2 LÁNSAFTURGJALD 6.37.6.01. 35
5.1.3 PARTABRØV, YMISK VIÐURSKIFTI 6.37.6.11. 35
5.1.4 BARSILSSKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.04. 36
5.1.5 STRANDFARASKIP LANDSINS (LANDSFYRITØKA) 14.38.2.01. 36
**5.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 38**
5.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 6.11.1.16. 38
5.2.2 DJÓRALÆKNATÆNASTUR (RAKSTRARJÁTTAN) 6.33.1.04. 38
5.2.3 KAPPINGARRÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.17. 38
5.2.4 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ 6.37.2.04. 38
5.2.5 VÁGA FLOGHAVN (LANDSFYRITØKA) 6.38.2.08. 39
5.2.6 VÁGA FLOGHAVN (LØGUJÁTTAN) 6.38.2.09. 39
5.2.7 FLOGFERÐSLA (LØGUJÁTTAN) 6.38.2.13. 39
5.2.8 P/F VÁGA FLOGHAVN, APPORTINNSKOT 6.38.2.17. 39
5.2.9 UMSITING AV BARSILSSKIPANINI (RAKSTRARJÁTTAN) 6.39.4.04. 42
5.2.10 STRANDFARASKIP LANDSINS (LØGUJÁTTAN) 14.38.2.02. 42

6 MENTAMÁL 43

6.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 43
6.1.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.14. 43
6.1.2 SKÚLABÓKAGRUNNURIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.16. 43
6.1.3 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 44
6.1.4 EFTIRÚTBÚGVING OG SKEIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.34. 44
6.1.5 STUÐUL TIL FÓLKASKÚLAR 7.23.2.03 45
6.1.6 SKÚLIN Á TRØÐNI (LØGUJÁTTAN) 7.23.2.12. 45
6.1.7 SKÚLADEPIL Í SUÐUROY (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.06. 45
6.1.8 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.07. 46
6.1.9 FISKIVINNUSKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.08. 47
6.1.10 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.14. 48
6.1.11 GJALD FYRI LÆRUSÁTTMÁLAR O. 7.23.3.15. 48
6.1.12 MUSIKKSKÚLAR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.5.10. 48
6.1.13 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (LØGUJÁTTAN) 7.23.6.03. 49
6.1.14 ALMANNA- OG HEILSUSKÚLI FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.11. 49
6.1.15 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.16. 49
6.1.16 YMISKAR VERKÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.23. 50
6.1.17 KRINGVARP FØROYA (LANDSFYRITØKA) 7.24.4.06. 50
6.1.18 LÁNSAFTURGJALD 7.24.8.01. 50
6.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 51
6.2.1 NÆMINGAHEIM 7.23.1.40. 51
6.2.2 FÓLKASKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.01. 51
6.2.3 SKÚLADEPIL Í MARKNAGILI (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.09. 51
6.2.4 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.5.07. 51
6.2.5 UNGDÓMS- OG BYGDARHÚS 7.24.1.25. 51
6.2.6 BYGDASØVN 7.24.3.16. 52
6.2.7 KIRKJUBØMÚRURIN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.23. 52

7 HEILSUMÁL 53

7.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 53
7.1.1 SJÚKRAKASSAR 8.20.2.01. 53
7.1.2 KOMMUNULÆKNASKIPANIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.04. 53
7.1.3 ÚTBÚGVING AV YNGRI LÆKNUM (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.05. 53
7.1.4 ÍLEGUSAVNIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.11. 54
7.1.5 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.04. 54
7.1.6 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.20. 57
7.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 60
7.2.1 KOPPSETINGAR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.20.1.10. 60
7.2.2 HEILSUKANNINGAR AV BARNAKONUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.20.1.16. 60
7.2.3 LÆKNAKANNINGAR AV BØRNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.20.1.19. 60
7.2.4 HEILSUVERKIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.02. 60
7.2.5 VIÐGERÐARSTOVNURIN HEILBRIGDI (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.4.02. 61
7.2.6 LÁNSAFTURGJALD 8.20.5.01. 61
7.3 ÚT- OG UMBYGGING, VIÐLÍKAHALD OG RENOVERING AV LANDSSJÚKRAHÚSINUM 61

8 ALMANNAMÁL 67

8.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 67
8.1.1 BARNAVERND (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.01. 67
8.1.2 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.0.5 67
8.1.3 ELDRARØKT (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.04. 68
8.1.4 ANSINGARSAMSÝNING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.6.10. 68
8.1.5 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.7.01. 69
8.1.6 FÓLKAPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.01. 71
8.1.7 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.05. 71
8.1.8 VIÐBÓT TIL ÁVÍSAR PENSJÓNISTAR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.13. 71
8.1.9 VIÐMERKINGAR UM MEIRNÝTSLU/EYKAJÁTTAN 72
8.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 73
8.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.8. 73
8.2.2 KT-HEILDARSKIPAN TIL ALMANNASTOVUNA (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.1.06. 73
8.2.3 BARNAÍSKOYTI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.06. 73
8.2.4 RÁÐGEVANDI TOYMI (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.3.18. 74
8.2.5 SERFORSORG (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.01. 74
8.2.6 BÚSTOVNAR O.A. (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.02. 74
8.2.7 LÁN TIL ELLIS- OG RØKTARHEIM Í VÁGI (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.14. 76
8.2.8 ELDRASAMBÝLI (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.16. 76
8.2.9 SERFLUTNINGSSKIPAN LANDSINS 8.21.6.17. 77
8.2.10 SJÓNDEPILIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.20. 77
8.2.11 UMSORGANARARBEIÐI 8.21.8.08. 77
8.2.12 NÁMSFRØÐINGAR Í FRAMHALDSÚTBÚGVING (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.9.04. 77

9 INNLENDISMÁL 79

9.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 79
9.1.1 INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 14.11.1.28. 79
9.1.2 SØLA AV LANDSINS OGNUM (LØGUJÁTTAN) 6.11.1.47. 79
9.1.3 AKSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 6.38.4.01. 79
9.1.4 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 14.14.3.01. 80
9.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 81
9.2.1 NÝGGIR LANDSVEGIR (LØGUJÁTTAN) 6.38.1.07. 81
9.2.2 STUÐUL TIL INFRAKERVIÐ Á ÚTOYGGJUM 6.38.1.18. 81
9.2.3 SANDOYARTUNNIL (LØGUJÁTTAN) 6.38.2.23. 81
9.2.4 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN, FYRISITING (RAKSTRARJÁTTAN) 14.14.3.04 82
9.2.5 SPILLOLJUREINSING 14.30.1.10. 82
9.2.6 UMHVØRVISSTOVAN (LØGUJÁTTAN) 14.37.4.05. 82

10 UTTANRÍKISMÁL 83

10.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 83
10.1.1 UTTANRÍKISTÆNASTAN (RAKSTRARJÁTTAN) 16.11.1.54. 83
10.1.2 SAMVIT (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.03. 84

11 SAMLAÐ YVIRLIT MEIR-/MINNINÝTSLA 85

# 0 Inngangur

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.” (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, greiða Landsgrannskoðanini frá um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið tilfarið fyri 2008 og hevur havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin, sambært § 12, løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu fyri árið 2008, hóast samlaða ársfrágreiðingin um grannskoðan av landsroknskapinum ikki er liðug. Hetta fyri at Løgtingið í størri mun kann nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina, sum sambært tingskipanini verður viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til Løgtingið.

Í frágreiðingini hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki sær víst á og umrøtt høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismanni/aðalráði.

Í frágreiðingini verða eisini umrødd onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Gjaldstovan hevur sett landsroknskapin upp sambært løgtingsfíggjarlógini fyri 2008.

Landsgrannskoðanin hevur valt at gera frágreiðingina sambært fráboðan nr. 84 frá 30. september 2008 “um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar”. Raðfylgjan av høvuðskontum víkir í frágreiðingini tí í einstøkum førum frá raðfylgjuni í landsroknskapinum.

Argir, 8. september 2009

Beinta Dam

# 1 FORMLIG VIÐURSKIFTI

## 1.1 Játtanarviðurskifti

### 1.1.1 Fíggjarlógin

Játtanarárið 2008 var merkt av, at upprunaliga uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 2008 fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007. Ein bráfeingis játtanarlóg fyri 2008 kom tí í gildi 1. januar 2008.

Ikki fyrr enn 22. apríl 2008 varð eitt endurskoðað uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2008 lagt fram. Tað varð samtykt 30. mai 2008, og lýst 10. juni 2008.

### 1.1.2 Fíggjarnevndarskjøl

27. juni 2008 játtaði Fíggjarnevndin umsókn um eykajáttan 8.738 t.kr. til Strandfaraskip Landsins.

3. juli 2008 játtaði Fíggjarnevndin umsókn um eykajáttan 3 mió.kr. til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum.

### 1.1.3 Eykajáttanir

Í eykajáttanarlógini fyri september 2008, sum varð samtykt 18. november 2008, vórðu játtanirnar til sjúkrahúsini hækkaðar.

7. november 2008 varð eykajáttanarlóg november 2008 samtykt, har 30 mió.kr. vórðu játtaðar at tekna nýggjan partapening í P/F Smyril Line.

Uppskot til eykajáttanarlóg november 2008-2, við 56,8 mió.kr. í nettoútreiðslum, varð lagt fyri Løgtingið 25. november 2008. 17. desember 2008 varð eykajáttanarlógin, har Fíggjarnevndin hevði mælt til nógvar broytingar, samtykt.

Í eykajáttanarlógini desember 2008, sum varð samtykt 19. desember 2009, vórðu 300 mió.kr. játtaðar til at veita íslendsku stjórnini eitt gjaldførislán.

### 1.1.4 Eykajáttanarlóg november 2008-2

Í sambandi við gjøgnumgongdina av frávikum millum játtan og nýtslu hevur landsstýrismaðurin í almannamálum víst á, at hevði umbønin um eykajáttan verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið væl minni.

Í viðgerðini av uppskotinum um eykajáttanarlóg november 2008-2 legði Fíggjarnevndin dent á, at fleiri umbønir um eykajáttan ikki luku treytirnar í Stýrisskipanarlógini, við tað at útreiðslurnar longu vóru hildnar, tá umbønin um eykajáttan varð løgd fyri Løgtingið.

Landsgrannskoðanin hevur hugt gjøllari eftir tilgongdini til umbønirnar um eykajáttan, og hví tær komu so seint til Løgtingið.

Í skrivi 7. juli 2008 bað Almannamálaráðið Almannastovuna meta um nýtsluna av lógarbundnum veitingum í 2008.

Í skrivi 8. august 2008 bað Almannastovan um eykajáttan til tær flestu lógarbundnu veitingarnar, samanlagt um 35 mió.kr. Almannastovan hevði mett um samlaðu útreiðslurnar við støði í teimum fyrstu 7 mánaðunum í 2008, og har endaligu bókingarnar fyri juli 2008 ikki vóru lidnar, var støðið 6 mánaðir.

Í telduposti 19. august 2008 til Fíggjarmálaráðið spurdi Almannamálaráðið, nær umbøn um eykajáttan skuldi verða latin Fíggjarmálaráðnum.

Sambært Fíggjarmálaráðnum finst einki skrivligt svar, tí tað varð avgreitt í telefonsamrøðu, men Fíggjarmálaráðið vísir til svar til Fiskimálaráðið sama dag um sama spurning, har Fíggjarmálaráðið 21. august 2008 svarar, at støða er ikki tikin til, nær freistin fyri at lata umbøn til Fíggjarmálaráðið um eykajáttan verður, men væntandi verður tað um 2-3 vikur.

15. september 2008 loysti løgmaður landsstýrisfólkini úr Tjóðveldi úr embæti teirra sum landsstýrisfólk. Nýggj samgonga varð skipað 26. september 2008.

Í telduposti 7. oktober 2008 til øll landsstýrisfólk og aðalráð boðar Fíggjarmálaráðið frá:

> *"Latið er upp umfar í búskettskipanini til eykajáttanarlóg. Ætlanin er at fáa hesa niðan í Løgtingið sum skjótast.*
>
> *Fyri at politiska viðgerðin í landsstýrinum og Løgtinginum skal ganga so smidliga og skjótt sum til ber, er neyðugt at allir partar arbeiða saman.*
>
> *Tískil eru tað sum meginregla bert framskrivingar av lógarbundnum útreiðslum og útreiðsluneutralar raðfestingar av løgujáttanum, sum verða tiknar við."*

Í telduposti 10. oktober til Fíggjarmálaráðið sendir Almannamálaráðið eina fyribilsútgávu av eykajáttanarumbønini fyri Almannamál, og sambært Fíggjarmálaráðnum er tað fyrstu ferð, at Fíggjarmálaráðið verður kunnað um, hvørjar játtanir á almannaøkinum fyri 2008 ikki fara at halda.

Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiddi ráðið eftir hetta við at fáa savnað inn tilfar frá aðalráðunum, sum høvdu umbønir um eykajáttan, og at fáa sett samlaðu eykajáttanina upp.

18. oktober 2008 verður eykajáttanin sett á skrá til landsstýrisfund, og verður viðgjørd á landsstýrisfundi 20. oktober 2008. Í frásøgnini frá landsstýrisfundinum stendur soleiðis:

> *"Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði fram uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri oktober 2008 (bruttolisti). Hann gjøgnumgekk uppskotið grein fyri grein og upplýsti, at hann fer at arbeiða ímóti at minka um upphæddirnar, so at samlaða upphæddin fyri eykajáttanina fer úr 83,7 mió.kr. í 43 mió.kr. Málið varð umrøtt fyri hvørt øki sær. Landsstýrismaðurin fer nú at viðgera málið við landsstýrisfólkini. Uppskotið verður lagt fyri landsstýrisfund seinni í vikuni."*

Sambært Fíggjarmálaráðnum varð arbeitt í vikuni eftir landsstýrisfundin við at fáa minkað um eykajáttanina, og hon var aftur fyri á landsstýrisfundi 27. oktober 2008. Tá varð samtykt, at hon skuldi leggjast fyri Løgtingið. Sama dag varð teldupostur sendur Løgtinginum við uppskoti til eykajáttanarløgtingslóg fyri oktober 2008.

Á landsstýrisfundi 30. oktober 2008 varð umrøtt, um tað bar til at sleppa frá at biðja um eykajáttan til lógarbundnar útreiðslur, har meirnýtsla longu var staðfest. Talan var um "endurbúgving undir vanligari forsorg". Løgfrøðiligt notat varð lagt fram, har

niðurstøðan var, at antin mátti verða biðið um eykajáttan ella mátti lógarbroyting til. Eftir hetta varð eykajáttanaruppskotið tikið aftur.

Aðalstjórin í fíggjarmálaráðnum sendi 31. oktober 2008 teldupost til starvsfelagan í almannamálaráðnum, har hann bað um neyvari frágreiðing um nýtsluna til endurbúgving og til fyritíðarpensjón. Frágreiðing kom frá Almannamálaráðnum við telduposti 5. november 2008.

Fíggjarmálaráðið hevur kunnað Landsgrannskoðanina um, at um hesa tíðina varð arbeitt av øllum alvi í Landsstýrinum við politisku viðgerðini av at broyta fíggjarlógaruppskotið fyri 2009. Samstundis skuldi eykajáttanin til Smyril Line eisini avgreiðast. Tí var ikki orka at avgreiða eykajáttanina, fyrr enn arbeiðið við fíggjarlógini nærum var liðugt. Harafturat komu summar broytingar til eykajáttanina so seint sum 13. oktober 2008 frá Mentamálaráðnum.

Á landsstýrisfundi 21. november 2008 varð samtykt, at eykajáttanin kundi verða borin í Løgtingið.

Eykajáttanarlógin varð løgd fram 25. november 2008. Fíggjarnevndin tók ikki undir við flestu eykajáttanunum, men vísti m.a. á, at fleiri umbønir ikki luku treytirnar í Stýrisskipanarlógini, har staðfest verður, at ongin útreiðsla kann verða hildin uttan játtan í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Eitt broytingaruppskot frá Fíggjarnevndini um at strika flestu eykajáttanirnar varð samtykt.

Fíggjarnevndin vísti í álitinum á, at meirnýtslan fór at verða staðfest í roknskapinum, og tá ið hann fór at verða framlagdur, fekk Løgtingið høvi at taka støðu til, hvat skuldi verða gjørt.

Landsgrannskoðanin tekur undir við, at umbøn um eykajáttan eigur ikki at verða løgd fyri Løgtingið so seint í árinum, at útreiðslurnar, sum eykajáttanirnar eru ætlaðar til, longu eru hildnar.

Hinvegin ber til at siga, at hevði ein eykajáttanarlóg verið løgd fram og samtykt í august ella september 2008, høvdu meirnýtslurnar 2008 verið væl minni.

## 1.2 Góðkenning av roknskapinum

Aðalráðini og stovnarnir, sum hoyra undir tey, skulu leggja fram roknskap eftir reglum, sum Fíggjarmálaráðið hevur ásett. Roknskapirnir skulu verða gjørdir í Búskaparskipan landsins, og skulu geva eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og ognum og skyldum við fíggjarárslok.

### 1.2.1 Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skulu stovnsleiðararnir góðkenna roknskapirnar mótvegis hægri myndugleika. Føroya Gjaldstova ásetur reglurnar. Í sambandi við góðkenningina skulu stovnsleiðararnir meta, um nýtslan er rímilig samsvarandi virksemi stovnsins farna tíðarskeið. Ásetingarnar hava verið í gildi síðani 1. januar 1997.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í september 2008 vísti Landsgrannskoðanin á, at fleiri stovnar á fleiri økjum ikki høvdu hildið reglurnar.

Á evnisdegi í Norðurlandahúsinum 29. januar 2009 fyri Fíggjarnevnd, løgmanni, landsstýrisfólkum og umboðum fyri áðalráðini og stovnar kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um eina nýggja skipan, sum var ment til at góðkenna mánaðar-roknskapirnar. Gjaldstovan var farin í holt við at seta skipanina í verk og atgongd til skipanina fór at vera umvegis portalin hjá Gjaldstovuni.

Í tíðindaskrivi 12. februar 2009 frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum heitir hann "*á stovnsleiðarar um at halda játtanir, men stovnsleiðarar fáa samstundis nýggj amboð at stýra eftir. Sum nakað nýtt verður nú eisini kravt, at landsstýrisfólkini hvørt í sínum lagi, halda neyvt eyga við peninganýtsluni á sínum ábyrgdarøkjum.*"

Landsgrannskoðanin skal gera vart við, at hetta er sum so onki nýtt. Síðani 1. januar 1997 hevur verið álagt stovnsleiðarum at ansa eftir peninganýtsluni.

Sambært § 33 í Stýrisskipanarlógini situr hvør landsstýrismaður fyri sínum málsøkjum. Sambært § 4, nr. 3, í Ll. nr. 90/1996 "um ábyrgd landsstýrisins", áliggur lands-stýrismonnum í rímiligan mun at føra eftirlit við og áseta reglur.

Sostatt er heldur einki nýtt í fráboðanini frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, har kravt verður, *"at landsstýrisfólkini hvørt í sínum lagi, halda neyvt eyga við peninganýtsluni á sínum ábyrgdarøkjum"*. Tað hevur verið galdandi síðani § 33 í stýrisskipanarlógini og lóg um ábyrgd landsstýrisins kom í gildi Ólavsøkudag 1996.

Hinvegin heldur Landsgrannskoðanin tað vera at fegnast um, at fokus verður sett á økið, og at nýggj amboð verða ment til at stuðla hesum arbeiði.

### 1.2.2 Ársroknskapurin

Í roknskaparkunngerðini § 8, stk. 2, stendur, at játtanarroknskapir verða gjørdir fyri hvønn mánað, fyri hvørt ískoytistíðarskeið og fyri fíggjarárið (ársroknskapur).

Í roknskaparrundskrivinum frá februar 2001 stendur í broti 2 "Roknskaparframløga/-góðkenning":

> *"Játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytistíðarskeiðið er samstundis ársroknskapurin, og skal hann verða sendur út til allar stovnar o.o. við fráboðan um, at tað er endaligi ársroknskapurin."*

Harafturat er ásett

> *"Tá ið játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytisskeiðið (ársroknskapurin) er góðkendur, skal Gjaldstovan hava avrit av góðkenningarskrivinum."*

Gjaldstovan boðaði tíðliga í mars 2009 aðalráðum og stovnum frá, at 14. skeið fyri 2008, sum varð sent út fyrstu vikuna í mars 2009, var "ársroknskapurin".

Sambært yvirliti frá Gjaldstovuni í juli 2009 hevur bert eitt aðalráð hildið ásetingina um at góðkenna ársroknskapin:

- Løgmansskrivstovan hevur góðkent øll 6 stovnsnummur,
- Fíggjarmálaráðið hevur góðkent 25 stovnsnummur av 36,
- Fiskimálaráðið hevur góðkent 45 stovnsnummur av 59,
- Vinnumálaráðið hevur góðkent 7 stovnsnummur av 59,
- Mentamálaráðið hevur góðkent 28 stovnsnummur av 126,
- Almanna- og Heilsumálaráðið hevur góðkent 86 stovnsnummur av 122,

- Innlendismálaráðið hevur góðkent 23 stovnsnummur av 28,
- Uttanríkisráðið hevur onki góðkent av teirra 5 stovnsnummrum.

Landsgrannskoðanin heldur tað als ikki vera nøktandi, at roknskapirnir ikki verða góðkendir sambært ásettu tíðarfreistunum.

Í august 2008 boðaði Fíggjarmálaráðið í skrivi til Landsgrannskoðanina frá, at Gjaldstovan arbeiddi við einari talgildari verkgongdarloysn at góðkenna mánaðar/ársroknskapin, sum væntandi kom at virka frá ársskiftinum (2008/09).

Sum nevnt frammanfyri boðaði Fíggjarmálaráðið frá í januar 2009, at elektronisk "Roknskapargóðkenningarskipan" fór at verða sett í verk í 2009. Verandi mannagongd, har stovnsleiðarar lata aðalráði sínum góðkenningarskjal í pappírsformi, og aðalráðini lata Fíggjarmálaráðnum góðkenningarskjal í pappírsformi, fer at halda uppat.

Í juli 2009 hevur Gjaldstovan kunnað um, at roknskapargóðkenningarskipanin hevur verið royndarkoyrd, fyrst av Fíggjarmálaráðnum, og síðani av øðrum aðalráðum og stovnum.

Gjaldstovan hevur eisini boðað frá, at verandi góðkenningarmannagongd "í pappírsformi" heldur fram - við síðuna av royndarkoyringini av Roknskapargóðkenningarskipanini - til Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan seinni í 2009 fer at boða frá, at "pappírs mannagongdin" er endaliga tikin av.

## 1.3 Ógreiða um verklagslógir

Sambært játtanarskipanini er meginreglan, at tá ið talan er um størri løgujáttanir, sum ofta fevna um fleiri fíggjarár, leggur landsstýrismaðurin uppskot um verklagslóg fyri Løgtingið. Seinastu árini eru fleiri verklagslógir samtyktar.

Landsgrannskoðanin hevur samanhildið útreiðslurnar í landsroknskapunum við útreiðslukarmarnar, sum eru ásettir í verklagslógunum, og kannað, hvussu peningurin er nýttur.

Undir “Mentamálum” verður umtalað, at á fleiri løgujáttanum, grundaðar á verklagslógir, hava útreiðslur verið til útgerð og innbúgv.

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur víst á, at hesar útreiðslur vanliga ikki verða roknaðar við í upprunaliga byggikostnaðin, sum er kunngjørdur í verklagslógini, men verða tiknar við sum ein útreiðsla seinasta byggiárið.

Undir “Heilsumál” verður umtalað, at í sambandi við “út- og umbygging, viðlíkahald og renovering av Landssjúkrahúsinum” eru 1,4 mió.kr. nýttar til innbúgv. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið til verklagslóg verður onki nevnt um innbúgv.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum vísir á, at tað hevur verið vanligt, í sambandi við slíkar verklagslógir, at positivar viðmerkingar hava staðið í lógini, um hon ikki fevndi um innbúgv og útgerð.

Eingin tílík viðmerking hevur verið í sambandi við játtanirnar til út- og umbyggingar á Landssjúkrahúsinum. Tá ongin serlig játtan hevur verið til útgerð og innbúgv, hevur tað verið roknað sum ein natúrligur partur av verkætlanini.

Sostatt heldur landsstýrismaðurin í mentamálum, at útreiðslur til útgerð og innbúgv ikki verða roknaðar við í byggikostnaðin í einari verklagslóg, meðan landsstýrismaðurin í heilsumálum hinvegin heldur, at útgerð og innbúgv verða roknað sum ein natúrligur partur av verkætlanini, um einki annað er viðmerkt í verklagslógini.

Landsgrannskoðanin mælir til, at Fíggjarmálaráðið tekur støðu til spurningin.

# 2 LØGMANSFYRISITINGIN

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 500 | 506 | 6 |
| Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) | 6.480 | 7.906 | 1.426 |

## 2.1 Meirnýtsla/frávik

### 2.1.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 2.11.1.12

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Meirnýtslan er 6 t.kr.

Høvuðskontan ber heitið “Viðlíkahald”, og sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er “*endamálið við hesari rakstrarjáttan at røkja landsins ognir í Tinganesi og úti á Reyni*”. Landsgrannskoðanin hevur fyrr í frágreiðingum víst á ógreiðu um játtanir til felags viðlíkahald.

Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar m.a. nýttar til:

1. kr. 14.600 at koyra møblar
2. - 21.744 at koyra rusk
3. - 43.621 at keypa orkusparandi perur
4. - 3.838 at keypa fløgg

Vit bóðu Løgmansstjóran vátta, at útreiðslurnar nevndar frammanfyri ikki vóru vanligar rakstrarútreiðslur hjá Løgmansskrivstovuni, men vóru útreiðslur til viðlíkahald, ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, *“at røkja landsins ognir í Tinganesi og úti á Reyni”*, soleiðis sum hugtakið “viðlíkahald” er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

ad. 1) Koyring av møblum

Sambært løgmanni er talan ikki um vanligar rakstrarútreiðslur hjá Løgmansskrivstovuni, men um útreiðslur í sambandi við at nýggj stjórnarráð eru sett á stovn. Løgmansskrivstovan hevur rindað fyri hesar útreiðslur, sum kanska áttu at verið goldnar av øðrum stjórnarráðum.

Í sambandi við at nýggj stjórnarráð eru sett á stovn, eru eisini ávísar hølis- og bygningsútreiðslur, m.a. er øll ovara hæddin í Skansapakkhúsinum sett í stand. Útreiðslurnar fevna um viðurskifti, sum lutvíst kunnu metast sum viðlíkahaldsútreiðslur av hølum og bygningum, sum ongin leiga verður goldin fyri. Tí hevur Løgmansfyrisitingin hildið, at frægast var at bóka hesar útreiðslur sum viðlíkahaldsútreiðslur.

ad. 2) Koyring av ruski

Sambært løgmanni stava útreiðslurnar fyrst og fremst frá burturbeining í sambandi við viðlíkahald. Meginparturin stavar frá øðrum ráðum, t.v.s. frá Uttanríkis-, Innlendis- og Vinnumálaráðnum, umframt øðrum, sum øll húsast í Tinganesi.

Tað er trupult at skilja útreiðslupartin hjá Løgmansskrivstovuni frá øllum hinum. Tí er alt bókað á eina kontu, har størsti parturin av útreiðslunum hoyra heima.

ad. 3) Keyp av orkusparandi perum

Sambært løgmanni stava útreiðslurnar til orkusparandi perur frá keypi til onnur ráð, t.v.s. Uttanríkis-, Innlendis- og Vinnumálaráðið, umframt til onnur, sum húsast í Tinganesi. Minsti parturin fer til sjálva Løgmansskrivstovuna.

ad. 4) Keyp av fløggum

Sambært løgmanni er tað ivasamt, um rætt er at bóka hesa útreiðslu á viðlíkahalds-kontuna, hóast flaggingin er fyri fleiri ráð.

Løgmaður kunnar um, at Løgmansskrivstovan arbeiðir við at finna eina betri og meira hóskandi loysn til komandi løgtingsfíggjarlóg.

### 2.1.2 Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) 2.12.3.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.480 t.kr. Meirnýtslan er 1.426 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 1.415 t.kr.

Sambært viðmerkingunum eiga landsstýrisfólkini, sum ikki hildu fram, tá nýggjar samgongur vórðu skipaðar ávikavist í februar og september 2008, at fáa fráfaringarløn eftir Ll. nr. 10/1993 “um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.” Harumframt eru 9 landsstýrisfólk í seinast skipaðu samgongu í mun til 8 frammanundan.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eyka-játtanina varð samtykt.

## 2.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Umbygging í Tinganesi (rakstrarjáttan) | 1.000 | 806 | 194 |

### 2.2.1 Umbygging í Tinganesi (løgujáttan) 2.11.1.21.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Minninýtslan er 194 t.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 75 t.kr. nýttar til bókaútgávuna “Spor í Tinganesi”, sum Løgmansskrivstovan og Fróðskapur í felag hava givið út.

Útreiðslan er bókað undir standardkontu 31 “Bygging og løguframleiðsla” á StRk 3131 “Bygningar, privat”, endamál 3300 “Størri ábøtur” og verkætlan 1002 “Projekteringsútreiðslur”.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er sundurgreiningin á standardkontur ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til íløgu, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til íløgur (standardkonta 31), soleiðis sum hetta útreiðsluslag er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, og ikki til at geva út bøkur.

Landsgrannskoðanin heldur, at talan er um eina umsitingarútreiðslu, ið átti at verið hildin av játtanini hjá Løgmansskrivstovuni.

Løgmansskrivstovan er ikki samd við Landsgrannskoðanini og vísir til viðmerkingarnar í fíggjarlógini, har m.a. stendur *“..játtanin í 2008 verður sostatt nýtt til ráðlegging, bygging og útvegan av serligum tilfari um Tinganes...”*

Løgmansskrivstovan vísir á, at heildarverkætlanin ”Umbygging í Tinganesi” er í tveimum, sjálv umbyggingin av bygningunum og uttanumøkið í Tinganesi. Fyri at útvega tilfar til seinna partin, varð bókin ”Spor í Tinganesi” hildin at vera sera viðkomandi tilfar, sum støða varð tikin til at stuðla eftir kønari fakligari ráðgeving.

Sambært Løgmansskrivstovuni er útreiðslan viðkomandi í sambandi við *”útvegan av serligum tilfari um Tinganes”*. Uttan slíkt tilfar ber ikki til at arbeiða við tí partinum av verkætlanini, sum hevur við uttanduraøkið í Tinganesi at gera.

Løgmansskrivstovan heldur, at tað hevði verið beinleiðis skeivt at nýtt rakstrarjáttanina hjá Løgmansskrivstovuni til hetta endamál, tá ið tilfarið er partur av einari verkætlan, sum serstøk játtan er fingin til.

Løgmansskrivstovan ger tó vart við, at tað avgjørt er ætlanin, at henda játtan í høvuðsheitum skal verða brúkt til íløgur og beinleiðis fyrireiking til íløgur.

# 3 FÍGGJARMÁL

## 3.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Søla av partabrøvum í P/f Elektron | -5.000 | - | 5.000 |
| TAKS (rakstrarjáttan) | 65.063 | 66.325 | 1.262 |
| Eftirløn landsstýrismanna (lógarbundin játtan) | 1.150 | 1.340 | 190 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) | 11.800 | 12.077 | 277 |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) | 14.500 | 17.679 | 3.179 |
| Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) | 101.000 | 112.457 | 11.457 |
| Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) | 40.300 | 43.757 | 3.457 |
| KT-Fyrisiting | 5.000 | 5.472 | 472 |

### 3.1.1 Søla av partabrøvum í P/f Elektron 3.11.1.46.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan á 5 mió.kr. Ongin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaðan sølupris fyri partabrøv, 1,9 mió.kr., sum landið eigur í P/f Elektron, og sum í fíggjarlógunum fyri 2006, 2007 og aftur í 2008 varð mettur til 5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum fekst ikki politisk semja um at selja landsins partabrøv í P/f Elektron, og ætlanin er tí slept, fyribils í øllum førum.

Í fíggjarlógini 2009 er ongin játtan. Sambært viðmerkingunum er ongin ætlan um at selja partabrøvini í 2009.

### 3.1.2 TAKS (rakstrarjáttan) 3.15.1.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 65,1 mió.kr. Meirnýtslan er 1,3 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 54.779 | 55.332 | 553 |
| 24. EDV-skipanir hjá TAKS | 7.225 | 7.699 | 474 |
| 26. Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum | 3.059 | 3.294 | 235 |
| **Tilsamans** | **65.063** | **66.325** | **1.262** |

Undirkonta 20. "Vanligt virksemi"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 553 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu inntøkurnar áleið 400 t.kr. lægri enn mett var, og umbyggingin av móttøkuni í Fíggjarmálaráðnum gjørdist væl dýrari, enn roknað varð við.

Undirkonta 24. "EDV-skipanir hjá TAKS"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 474 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdist menningin av eSkattinum dýrari enn mett var frammanundan.

Undirkonta 26. "Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 235 t.kr.

Landsstýrismaðurin staðfestir, at játtanin í fleiri ár hevur verið ov lág í mun til veruliga virksemið. Í fíggjarlógini 2010 verða stig tikin at rætta skeivleikan.

### 3.1.3 **Eftirløn landsstýrismanna** (lógarbundin játtan) 3.18.2.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.150 t.kr. Meirnýtslan er 190 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð tilgongdin av eftirlønarmóttakarum størri enn mett var. Landsstýrismaðurin helt ikki, at meirnýtslan fór at verða so týðandi og stór, at neyðugt var at biðja um eykajáttan.

### 3.1.4 **Eftirlønir innan heilsuverkið** (lógarbundin játtan) 3.20.3.17.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.800 t.kr. Meirnýtslan er 277 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tilgongdin av eftirlønarmóttakarum varð størri enn mett var. Landsstýrismaðurin helt ikki, at meirnýtslan fór at verða so týðandi og stór, at neyðugt var at biðja um eykajáttan.

### 3.1.5 **Stuðul til flutning og dupult húsarhald** (lógarbundin játtan) 3.21.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14,5 mió.kr. Meirnýtslan er 3,2 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 3,5 mió.kr.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum var største meirnýtslan, at lógin varð broytt í mai 2008 við afturvirkandi gildiskomu fyri alt fíggjarárið 2008, har stuðulsupphæddirnar í høvuðsheitum vórðu hækkaðar.

### 3.1.6 **Stuðul til rentuútreiðslur** (lógarbundin játtan) 3.22.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 101 mió.kr. netto. Meirnýtslan er 11,5 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 7 mió.kr. netto.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum er størsta meirnýtslan, at rentustøðið hækkaði meira enn mett var.

Landsstýrismaðurin staðfestir eisini, at umbidna eykajáttanin ikki hevði rokkið til.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2009 verður roknað við somu upphædd sum í 2008, t.e. 108 mió.kr. netto.

### 3.1.7 **Læraraeftirlønir** (lógarbundin játtan) 3.23.2.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 40,3 mió.kr. Meirnýtslan er 3,5 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 2,7 mió.kr. netto.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tilgongdin av eftirlønarmóttakarum hevur verið størri enn mett var.

Landsstýrismaðurin staðfestir eisini, at umbidna eykajáttanin ikki hevði rokkið til.

### 3.1.8 **KT-fyrisiting** (rakstrarjáttan) 3.38.3.19.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.000 t.kr. netto. Meirnýtslan er 472 t.kr. netto.

t.kr.

| KT-fyrisiting | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -6.000 | -7.197 | -1.197 |
| Útreiðslur | 11.000 | 12.669 | 1.669 |
| **Tilsamans** | **5.000** | **5.472** | **472** |

Landsstýrismaðurin ásannar at fíggjarstýringin hjá KT-fyrisitingini ikki hevur verið nóg neyv, og leggur afturat, at leiðsluskifti var á heysti 2008.

## 3.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Fíggjarmálaráðið (rakstrarjáttan) | 9.160 | 8.834 | 326 |
| Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan) | 711 | 378 | 333 |
| Búskaparráðið (rakstrarjáttan) | 763 | 500 | 263 |
| Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan) | 1.706 | 1.191 | 515 |
| Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) | 500 | 24 | 476 |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin játtan) | 15.000 | 8.929 | 6.071 |
| FAS-endurgjald (lógarbundin játtan) | 53.600 | 51.645 | 1.955 |

### 3.2.1 **Fíggjarmálaráðið** (rakstrarjáttan) 3.11.1.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9.160 t.kr. Minninýtslan er 326 t.kr.

### 3.2.2 **Sáttmálaviðurskifti** (rakstrarjáttan) 3.11.1.36.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 711 t.kr. Minninýtslan er 333 t.kr.

### 3.2.3 **Búskaparráðið** (rakstrarjáttan) 3.15.1.13.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 763 t.kr. Minninýtslan er 263 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2009 ætlar landsstýrismaðurin at fremja broytingar viðvíkjandi Búskaparráðnum, millum annað er ætlanin at leggja dagligu umsitingina og skrivarauppgávurnar hjá ráðnum til Landsbankan at røkja.

### 3.2.4 **Umsiting av ogn og skuld landsins** (rakstrarjáttan) 3.15.1.23.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.706 t.kr. Minninýtslan er 515 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina *"røkir Landsbankin lán landskassans. Samsýningin fyri hetta arbeiði er ¼ promillu av ríkisláninum og ½ promillu av øðrum lánum. Av hesari kontu fer eisini samsýning til serstaka ráðgeving í sambandi við lánsbrævaútgávu. Hendan samsýning verður væntandi 500 tús. kr. í 2008."*

### 3.2.5 **Útgjald úr Trygdargrunninum** (lógarbundin játtan) 3.21.7.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 476 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina *"virkar Trygdargrunnurin sambært løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. við seinni broytingum. Grunnurin hevur til endamáls at tryggja løntakarunum lønarkrøv í sambandi við, at arbeiðsgevari kemur í fíggjartrot, arbeiðsgevari doyr, ella fyritøka hansara heldur uppat vegna vantandi fíggjarligan førleika."*

Í fíggjarlógini 2009 verður mett, at útgjaldið úr Trygdargrunninum í mesta lagi verður 500 t.kr.

### 3.2.6 Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin - játtan) 3.22.4.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15 mió.kr. Minninýtslan er 6,1 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina "*verður í 2008 ikki roknað við so stórum útreiðslum á hesari kontu, tí nógv byggiprojekt, sum eru í gongd, byrjaðu áðrenn 1. juli 2007 og tí hava rætt til MVG-undantøku eftir gomlu reglunum.*

*Av tí, at kostnaðurin av MVG-frítøkuni var sera ógreiður, er torført at meta um hvussu stór nýtslan veruliga verður á hesari játtan, í hvussu er ta fyrstu tíðina, umframt at nýtslan er heft at generella virkseminum í byggivinnuni.*"

Í fíggjarlógini 2009 vórðu játtaðar 15 mió.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 5 mió.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru í august 2009 nýttar knappar 18 mió.kr.

### 3.2.7 FAS-endurgjald (lógarbundin játtan) 3.35.1.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 53,6 mió.kr. netto. Minninýtslan er 2 mió.kr. netto.

## 3.3 Rentur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan í fíggjarlóg og roknskapartøl fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur í 2008.

### 3.3.1 Rentur av landsins skuld 20.50.1.

mió.kr.

| | Rentuútreiðslur 20.50.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentur at gjalda | 102,0 | 107,5 | 5,5 |
| | **Tilsamans** | **102,0** | **107,5** | **5,5** |

Á talvuni sæst, at rentuútreiðslur av landsins skuld eru 5,5 mió.kr. hægri, enn mett var.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur:

> *"Meginparturin av skuldini til danska statin varð í 2005 umløgd til lánsbrævaskuld.*
>
> *Eftirverandi skuldin til danska statin er tí í dag 500 mió.kr. Hendan skuld er rentufrí og fellur bara til gjaldingar um olja verður funnin í føroysku undirgrundini áðrenn 2018. Kursvirðið á lánsbrævaskuld landskassans er umleið 2,2 mia. kr.*
>
> *Tilsamans vóru rentuútreiðslurnar íroknað kursbroytingar av hesari skuld landskassans 63,3 mió.kr. í 2007 og eru mettar til 102 mió.kr. í 2008."*

### 3.3.2 Millumverandi við Tjóðbankan og Landsbankan 20.50.2.

mió.kr.

| | Rentuinntøkur 20.50.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentuinntøkur av innistandandi | 80,0 | 80,1 | 0,1 |
| 04. | Aðrar rentur | 5,0 | 2,1 | -2,9 |
| 07. | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | 15,6 | 20,9 | 5,3 |
| 10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | 20,0 | 20,5 | 0,5 |
| | **Tilsamans** | **120,6** | **123,6** | **3,0** |

Undirkonta 07. Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya

Talan er um eina meirinntøku 5,3 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina *"vórðu Í 2007 15,6 mió.kr. útgoldnar av avlopinum hjá Landsbankanum. Í 2008 verður somuleiðis roknað við 15,6 mió.kr."*

## 3.4 Inntøkur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan í fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2008.

### 3.4.1 Skattainntøkur 20.52.1.

mió.kr.

| | Skattainntøkur 20.52.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Vanligur landsskattur: | | | |
| | Vanligur lands- og kommunu-skattur | 2.616,2 | 2.617,6 | 1,4 |
| | Skattainntøka frá FAS-skipanini | 53,8 | 39,4 | -14,4 |
| | Flutt til kommunur | -1.250,0 | -1.329,8 | -79,8 |
| | **Vanligur landsskattur tilsamans** | **1.420,0** | **1.327,2** | **-92,8** |
| 06. | Kolvetnisskattur, persónar | 6,0 | 14,5 | 8,5 |
| 07. | Felagsskattur | 180,0 | 233,5 | 53,5 |
| 08. | Kolvetnisskattur, feløg | 3,0 | 3,3 | 0,3 |
| 11. | Kapitalvinningsskattur | 100,0 | 141,6 | 41,6 |
| 13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | 16,0 | 13,2 | -2,8 |
| 25. | Arvaavgjøld | 5,5 | 6,0 | 0,5 |
| 28. | Gjald til barsilsskipanina | 90,0 | 87,2 | -2,8 |
| 30. | Gjald frá Búnaðarstovuni | 2,8 | 2,6 | -0,2 |
| | **Tilsamans** | **1.823,3** | **1.829,1** | **5,8** |

Størstu frávikini eru "Vanligur landsskattur", sum er 92,8 mió.kr. lægri, og "Felagsskattur" og "Kapitalvinningsskattur", sum er ávikavist 53,5 mió.kr. og 41,6 mió.kr. hægri, enn mett var.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at talan er um millumrokning viðvíkjandi FAS-inntøkuni fyri nøkur ár, sum eru afturførd til kommunurnar.

Eftirsum 2007 gjørdist eitt gott ár fyri vinnulívið sum heild, kom væl meira inn í felagsskatti og kapitalvinningsskatti í 2008.

### 3.4.2 Avgjøld og tollur 20.52.2.

mió.kr.

| | Avgjøld og tollur 20.52.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Meirvirðisgjald | 1.375,0 | 1.240,2 | -134,8 |
| 04. | Tollavgjøld | 47,0 | 39,0 | -8,0 |
| 07. | Punktgjald | 205,0 | 178,3 | -26,7 |
| 10. | Lønhæddargjald | 16,3 | 17,2 | 0,9 |
| 13. | Brennioljugjald | 66,0 | 62,6 | -3,4 |
| 16. | Framleiðsluavgjald | 22,5 | 19,0 | -3,5 |
| 19. | Skrásetingargjald | 120,0 | 98,8 | -21,2 |
| 22. | Vegskattur (vektgjald) | 89,0 | 87,4 | -1,6 |
| 25. | Ferðaavgjald | 14,0 | 15,3 | 1,3 |
| 28 | Umhvørvisgjald á smyrjiolju | 3,2 | 1,6 | -1,6 |
| 30 | Tinglýsingargjald | 27,3 | 18,9 | -8,4 |
| | **Tilsamans** | **1.985,3** | **1.778,3** | **-207,0** |

Størstu frávikini eru "Meirvirðisgjald" 134,8 mió.kr., "Punktgjald" 26,7 mió.kr. og "Skrásetingargjald" 21,2 mió.kr. lægri, enn mett var.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at fíggjarkreppan hevur havt við sær, at inntøkurnar av meirvirðisgjaldi, punktgjøldum, og serstakliga skrásetingargjaldi - síðstu 4 mánaðirnar av 2008 - gjørdust lægri enn mett var.

### 3.4.3 Ymiskar inntøkur 20.52.3.

mió.kr.

| | Ymiskar inntøkur 20.52.3. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 15,0 | 15,0 | - |
| 04. | Útluting frá almennum partafeløgum | 15,0 | 13,9 | -1,1 |
| 10. | Aðrar inntøkur | 10,1 | 15,0 | 4,9 |
| | **Tilsamans** | **40,1** | **43,9** | **3,8** |

Undirkonta 04. Útluting frá almennum partafeløgum

Talan er um vinningsbýti frá:

| | |
|---|---|
| P/f Føroya Tele | 7,0 mió.kr. |
| P/f Virðisbrævamarknaður Føroya | 4,1 mió.kr. |
| P/f Atlantic Airways | 2,6 mió.kr. |
| P/f Tjaldur | 0,2 mió.kr. |
| **Tilsamans** | **13,9 mió.kr.** |

### 3.4.4 Aðrar inntøkur 20.52.3.10.

t.kr.

| | Aðrar inntøkur 20.52.3.10. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 02. | Skeinkiloyvi, avgjald | 50 | 205 | 155 |
| 04. | Navnaprógv | 10 | 13 | 3 |
| 05. | Bøtur | 700 | 807 | 107 |
| 07. | Burturlutingargjald | 1.000 | 1.329 | 329 |
| 09. | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 110 | 121 | 11 |
| 11. | Víddargjald | 8.200 | 10.744 | 2.544 |
| 12. | Nýtslugjald (royalties, oljufeløg) | - | 237 | 237 |
| 60. | Óvanligar inntøkur | - | 1.542 | 1.542 |
| | **Tilsamans** | **10.070** | **14.998** | **4.928** |

Størstu frávikini eru "Víddargjald" og "Óvanligar inntøkur", sum eru ávikavist 2.544 t.kr. og 1.542 t.kr. hægri, enn mett var.

Víddargjald er eitt árligt gjald, sum oljufeløgini gjalda fyri øki, tey hava fingið tillutað. Byrjanargjaldið er 500 kr. pr. ferkilometur pr. loyvisdag. Eftir 6 árum hækkar gjaldið árliga.

Høvuðskontan "Óvanligar inntøkur" verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða bókaðar aðrastaðni.

### 3.4.5 Heildarveiting o.t. 20.54.1.

mió.kr.

| | Heildarveiting o.t. 20.54.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Heildarveiting | 615,5 | 615,5 | - |
| 02. | Endurgjøld | 17,5 | 19,4 | -1,9 |
| | **Tilsamans** | **633,0** | **634,9** | **-1,9** |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit eitt endurgjald frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Hetta endurgjald var ikki komið við í roknskapirnar árini frammanundan, m.a. tí at samskiftistrupulleikar høvdu verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvagar endurgjaldsuppgerðin skuldi sendast. Talan var um mett endurgjald á 3 mió.kr. fyri tíðarskeiðið 1. januar 1977 – 31. desember 2004.

Í juli 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at "*kravið er og verður árliga gjørt galdandi, men at tað hongur í fíggjarstøðuni, eftirsum tað ikki higartil er goldið av danska statinum. Tað er líkt til, at hjá donsku myndugleikunum valdar óvissa, bæði um rættleikan av endurgjalds-kravinum og síðani eisini um, hvør stovnur/játtan skal halda útreiðslurnar.*"

Í juni 2008 kunnaði landsstýrismaðurin um, at líkt er til, at ein loysn verður funnin í málinum, bæði viðvíkjandi uppgerðini av kravinum og gjaldingini.

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, hevur landsstýrismaðurin í juni 2009 greitt frá, at føroyskir og danskir myndugleikar eru komnir ásamt um endurgjaldskravið fram til 30. juni 2000, og eisini um hvør danskur myndugleiki skal rinda.

### 3.4.6 Útlán 53.15.5.

mió.kr.

| | | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Gjaldførislán til Ríkisstjórn Íslands | 300,0 | 300,0 | - |
| | **Tilsamans** | **300,0** | **300,0** | **-** |

Í fíggjarlógini er eingin játtan. Í eykajáttanarlógini desember 2008 vórðu 300 mió.kr. játtaðar. Endamálið við játtanini var at fáa fíggjarliga heimild til at veita íslendsku stjórnini eitt gjaldførislán.

19. desember 2008 samtykti Løgtingið uppskot til løgtingslóg "um gjaldførislán frá Føroya Landsstýri til Ríkisstjórn Íslands". Endamálið við lógaruppskotinum var at fáa til vega materiellu heimildina.

## 3.5 Aðrar viðmerkingar

### 3.5.1 Ógreiða um játtanir til felags viðlíkahald

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum víst á ógreiðu um játtanir til felags viðlíkahald.

Víst hevur verið á, at hesar játtanir í ávísan mun verða brúktar til at keypa vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki eru at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt í oktober 2006, at tørvur framvegis var á tílíkum felags játtanum. Landsstýrismaðurin var samdur í, at tað var ov tilvildarligt og ógreitt, hvat varð bókað sum felags viðlíkahald. Tað kundi talað fyri, at tørvur var á einari reglugerð, sum útgreinaði, hvat kundi verða skrásett sum viðlíkahald.

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, hevur landsstýrismaðurin í juni 2009 ásannað, at einki er gjørt við málið.

Landsstýrismaðurin hevur eisini boðað frá, at í sambandi við at lógin um landsins játtanarskipan er samtykt, verður neyðugt til fíggjarlógina 2010 at gjøgnumganga allar høvuðskontur í fíggjarlógini. Tá er upplagt, at málið um játtanir til felags viðlíkahald verður tikið við í gjøgnumgongdini.

### 3.5.2 Fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum seinastu árini eisini umrøtt spurningin um at fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar. Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag gjørt fleiri stovnar og aðalráð varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar/-fyrisitingarútreiðslur á einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin ella aðalráðið umsitur.

Landsgrannskoðanin heldur ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, tá ið stovnar ella aðalráð spjaða fyrisitingarútreiðslur út á aðrar játtanir, ið stovnurin/aðalráðið hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini vera við til at fjala hækkandi fyrisitingar-útreiðslur.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt í oktober 2006 eisini, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun áttu at verið savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið mælti til, at umrøddu høvuðskontur og aðrar vórðu gjøgnumgingnar fyri at fáa staðfest, í hvønn mun fyrisitingarútreiðslur vóru á hesum játtanum, og um hesar útreiðslur áttu at verið fluttar til avvarðandi aðalráð.

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, hevur landsstýrismaðurin í juni 2009 ásannað, at einki er gjørt við málið.

Landsstýrismaðurin hevur eisini boðað frá, at í sambandi við at lógin um landsins játtanarskipan er samtykt, verður neyðugt til fíggjarlógina 2010 at gjøgnumganga allar høvuðskontur í fíggjarlógini, og er upplagt, at málið um spjaddar fyrisitingarútreiðslur verður tikið við í hesum arbeiði.

### 3.5.3 Endurrindan av tænastumannaeftirlønum

Endurrindan frá danska statinum

Í 2008 endurrindaði danski staturin 19,4 mió.kr. fyri læraraeftirlønir. Talan er um tann partin av eftirlønini, sum tænastumenn hava vunnið sær, áðrenn teir “vórðu yvirtiknir”. Hetta endurgjald verður tikið við í roknskapin undir § 20 “Inntøkur” undir málsøkinum “Heildarveiting o.t.”, høvuðskonta 20.54.1.01.

Onnur endurgjøld frá danska statinum verða bókað á teimum kontum, har eftirlønin verður útreiðsluførd. T.d. verða endurgjøld fyri eftirlønir til fyrrverandi starvsfólk undir Serforsorgini bókað sum negativ útreiðsla undir høvuðskontu “3.18.1.01. Tænastumannaeftirlønir.”

Spurdur, hví endurgjald fyri eftirlønarútreiðslur verður bókað ymiskt, hevur landsstýrismaðurin í juni 2009 svarað, at hann hevur einki greitt svar hesum viðvíkjandi.

# 4 FISKIVINNUMÁL

## 4.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 600 | 871 | 271 |
| Almenn jørð, søla (løgujáttan) | - | 52 | 52 |
| Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) | 450 | 513 | 63 |
| Upplýsing um grind (rakstrarjáttan) | 325 | 472 | 147 |
| Fiskirannsóknarstovan (rakstrarjáttan) | 12.176 | 12.900 | 724 |
| Magnus Heinason (rakstrarjáttan) | 10.395 | 11.932 | 1.537 |
| Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) | 18.600 | 22.359 | 3.759 |
| Fiskivinnumenning á landi | 1.000 | 1.123 | 123 |
| Útlán | -2.600 | 129 | 2.729 |
| Effektivar veðhaldsútreiðslur | -1.000 | -41 | 959 |

### 4.1.1 **Viðlíkahald** (rakstrarjáttan) 5.11.1.15.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 600 t.kr. Meirnýtslan er 271 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Fiskimálaráðið yvirtók málsøkið búnaðarmál frá Vinnumálaráðnum í 2008, men at ongin játtan fylgdi við til viðlíkahald. Nøkur av vind-eygunum á Búnaðardeplinum vóru í so vánaligum standi, at neyðugt var at skifta tey út. Tað kostaði 130 t.kr.

Í sambandi við umbyggingar á MRCC var komið fram á asbest í loftinum. Hesum var ikki lagt upp fyri, og kostaði tað 140 t.kr.

### 4.1.2 **Almenn jørð, søla** (løgujáttan) 5.33.2.11.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 0 kr. netto, 25 mió.kr. til útreiðslur og 25 mió.kr. til inntøkur.

Sambært landsroknskapinum 2008 eru útreiðslurnar 10,3 mió.kr. og inntøkurnar 10,3 mió.kr.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina er greitt frá um heimildirnar. Sambært Ll. nr. 45 frá 15. mai 2007 "um landsjørð" við seinni broytingum, er heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, so sum grundstykkir til húsabygging, og til handils-, ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál.

Eftir § 5 í Ll. nr. 21 frá 17. mai 2004 "um Búnaðargrunn" skal ágóðin frá søluni flytast Búnaðargrunninum, og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Talan er um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan.

Landsjørðin verður seld fyri fastan prís uttan alment útboð frammanundan, og verður í høvuðsheitum seld kommunum til byggilendi. Tað er sera ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld hvørt árið, og upphæddin er bert ein leyslig meting.

### 4.1.3 Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) 5.34.1.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 450 t.kr. Meirnýtslan er 63 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum verður játtanin brúkt til fastar nevndir og aðrar nevndir, ið landsstýrismaðurin setir at viðgera ávísar spurningar. Í 2008 kostaðu føstu nevndirnar:

- Fiskidaganevndin 265 t.kr.
- Fiskivinnuráðið 55 t.kr.
- Samstarvsráðið 34 t.kr.
- Fastar nevndir tilsamans 354 t.kr.

Harafturat setti landsstýrismaðurin tvær nevndir at viðgera fiskiorkuna og møguleikarnar hjá fjarfiskiflotanum. Hesar nevndir kostaðu ávikavist 120 t.kr. og 37 t.kr. Fiskiorkunevndin varð heldur dýrari enn mett var.

### 4.1.4 Upplýsing um grind (rakstrarjáttan) 5.34.1.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 325 t.kr. Meirnýtslan er 147 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð nýtslan størri, tí Føroyar hava formannin í vísindanevndini hjá NAMMCO, og tað hevur havt eyka útreiðslur við sær til ein uttanhýsis granskara. Formaðurin skuldi eftir ætlan skiftast út í 2008, men viðtøkurnar hjá vísindanevndini vórðu broyttar, so tíðarskeiðið hjá formanninum varð longt eitt ár.

### 4.1.5 Fiskirannsóknarstovan (rakstrarjáttan) 5.34.3.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12.176 t.kr. Meirnýtslan er 724 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 450 t.kr., tí øll játtanin til undirkontu “24: Varðveitan av fjølbroyttum flota” fór væntandi ikki at verða nýtt. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 20. Vanligt virksemi | 10.322 | 11.831 | 1.509 |
| 22. Ferðing og atburður hjá toski | 679 | 522 | -157 |
| 23. Fuglakanningarstøð | 566 | 560 | -6 |
| 24. Varðveitan av fjølbroyttum flota | 609 | 254 | -355 |
| 45. Verkætlanir | - | -267 | -267 |
| **Tilsamans** | **12.176** | **12.900** | **724** |

Sambært landsstýrismanninum eru orsøkirnar til meirnýtsluna:

1. Umbygging í kjallaranum.

Umbygging í kjallara kostaði 435 t.kr. Hesi høli skulu brúkast at hýsa Ph.d. lesandi, og tað fer at geva inntøkur til Fiskirannsóknarstovuna – nú Havstovuna – í framtíðini.

2. Vantandi lønarútgjald, av tí at sáttmálar ikki vóru komnir uppá pláss í 2008.

Av tí at sáttmálin hjá Magistarafelagnum, sum skuldi verið komin uppá pláss í oktober 2007, ikki bleiv avgreiddur fyrr enn ultimo 2008, varð ein stór eftirregulering, 434 t.kr., í 2009, sum kortini varð útreiðsluførd í 2008. Tað varð gjørt í samráði við Fíggjarmálaráðið, tí Fíggjarmálaráðið helt, at útreiðslan hoyrdi til í 2008.

### 4.1.6 Magnus Heinason (rakstrarjáttan) 5.34.3.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.395 t.kr. netto. Meirnýtslan er 1.537 t.kr. netto.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 9.775 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð játtanin hækkað 620 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum eru orsøkirnar til meirnýtsluna:

1. Inntøkur vórðu strikaðar í eykajáttanarlógini

Í eykajáttanarlógini varð skotið upp at lækka inntøkurnar 1.200 t.kr., av tí at fiskiskapurin var vánaligur. Broytingaruppskot um at strika hesa lækking varð samtykt.

2. Oljuútreiðslurnar vóru hægri

Av óvanliga høgu oljuprísunum í 2008 vórðu útreiðslur til olju 1 mió.kr. hægri í 2008 enn í 2007.

### 4.1.7 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) 5.34.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 18,6 mió.kr. Meirnýtslan er 3,8 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 3,4 mió.kr. netto.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum er torført at meta um lønirnar hjá fiskimonnum frammanundan, tí tær eru tengdar at fleiri viðurskiftum so sum veðri, oljuprísum, fiskaprísum og fiskiskapi.

Í august 2008 var Fiskimálaráðið varugt við, at játtanin til inntøkutrygd ikki fór at halda, og spurdi tá Fíggjarmálaráðið, nær søkjast kundi um eykajáttan. Fíggjarmálaráðið svaraði 21. august 2008, at tað fór at vera um 2-3 vikur.

7. oktober 2008 fekk Fiskimálaráðið at vita, at freistin at søkja um eykajáttan var 9. oktober 2008. Fiskimálaráðið søkti um eykajáttan 8. oktober 2008. Tá vóru 14,8 mió.kr. av játtanini brúktar.

Umbønin um eykajáttan kom í Løgtingið 25. november. Tá tað 17. desember gjørdist greitt, at Løgtingið ikki fór at veita eykajáttan, varð eitt útgjald av inntøkutrygd gjørt í samráði við Fíggjarmálaráðið. Hetta útgjald gjørdi, at játtanin á fíggjarlógini 2008 ikki helt.

### 4.1.8 Fiskivinnumenning á landi 5.34.4.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Meirnýtslan er 123 t.kr

Játtanin verður nýtt sambært Ll. nr. 84 frá 28. mai 1996 “um stuðul til menning av fiskivinnu á landi”. Stuðul kann verða veittur fiskavirkjum til at:

- virka vørur úr innfluttum fiski,
- vørumenna o.a.,
- stuðla menning av innaneftirliti.

Eisini verður játtanin nýtt til at gjalda fyri heilsuprógv hjá starvsfólki á fiskavirkjum og verksmiðjuskipum.

Sambært landsroknskapinum eru í 2008 nýttar 1.000 t.kr. til stuðul og 123 t.kr. til heilsuváttanir til starvsfólk á flakavirkjum.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at játtanin til “Fiskivinnumenning á landi” er strikað á fíggjarlógini 2009.

### 4.1.9 Útlán 5.34.5.01.

t.kr.

| 5.34.5.01. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 01. Útlán, inntøkur | -9.100 | -11.441 | -2.341 |
| 01. Útlán, útreiðslur | 6.500 | 11.570 | 5.070 |
| **Tilsamans** | **-2.600** | **129** | **2.729** |

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 9.100 t.kr. og ein útreiðslujáttan 6.500 t.kr.

Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 11.441 t.kr. og útreiðslurnar 11.570 t.kr.

Talan er um afturgjøld og eftirgeving av lánum, ið eru veitt fiskivinnuni við heimild í Ll. nr. 102/1988 “um endurnýgging av fiskiskipaflotanum” við seinni broytingum.

### 4.1.10 Effektivar veðhaldsútreiðslur 5.34.5.07.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 1.000 t.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru inntøkurnar 41 t.kr.

Talan um afturgjald til landskassan fyri goldnar borganir. Landskassin hevur bert smávegis veðhaldsskyldur eftir í skipaflotanum.

Í fíggjarlógini 2009 er ein inntøkujáttan 100 t.kr.

## 4.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan) | 16.051 | 14.327 | 1.724 |
| Granskingarætlanir (rakstrarjáttan) | 3.748 | 3.499 | 249 |
| Innsavnan av ull og skinnum | 750 | 517 | 233 |
| Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan) | 2.881 | 2.422 | 459 |
| Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) | 46.246 | 43.360 | 2.886 |
| Nýtt havrannsóknarskip (løgujáttan) | 2.900 | 1.710 | 1.190 |
| Sjúkratrygd (lógarbundin játtan) | 7.000 | 5.125 | 1.875 |

### 4.2.1 **Fiskimálaráðið** (rakstrarjáttan) 5.11.1.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 16.051 t.kr. Minninýtslan er 1.724 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 1.050 t.kr. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum vóru fleiri ósett størv í Fiskimálaráðnum í 2008.

### 4.2.2 **Granskingarætlanir** (rakstrarjáttan) 5.11.1.34.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.748 t.kr. Minninýtslan er 249 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fór ein av granskingarleiðarunum í annað starv.

### 4.2.3 **Innsavnan av ull og skinnum** 5.33.2.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 750 t.kr. Minninýtslan er 233 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er játtanin býtt sundur í stuðul til ull 450 t.kr., sum øll varð brúkt, og stuðul til skinn 300 t.kr., har einans 67 t.kr. vórðu brúktar.

At ikki allur stuðulin til skinn verður brúktur kemst av støðuni, sum Føroyar eru í tá ið ræður um útflutning av landbúnaðarvørum. Trupulleikin er, at føroyskir djóralæknar kunnu ikki skriva út nøktandi heilsuváttan, sum m.a. ES lond krevja, men arbeitt verður við at finna loysn fyri útflutningi av skinnum til garvingar.

### 4.2.4 **Lønjavningarstovan** (rakstrarjáttan) 5.34.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.881 t.kr. Minninýtslan er 459 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er stórt sæð onki brúkt av játtanini til KT. Ætlanin er at seta sjøtul á at menna KT-skipan til Lønjavningarstovuna í 2010.

Harumframt vóru ikki øll normerað størv sett í 2008.

### 4.2.5 **Fiskiveiðieftirlitið** (rakstrarjáttan) 5.34.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 46.246 t.kr. Minninýtslan er 2.886 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at fíggjarlógin 2008 varð ikki lýst fyrr enn 10. juni 2008. Óvissan um endaligu játtanina gjørdi, at fleiri starvsfólk føldu, at arbeiðsplássið var ótrygt, tí søgdu tey upp, og onnur fóru í farloyvi.

### 4.2.6 **Nýtt havrannsóknarskip** (løgujáttan) 5.34.3.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.900 t.kr. Minninýtslan er 1.190 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 300 t.kr. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum varð projekteringin ikki liðug í 2008.

### 4.2.7 **Sjúkratrygd** (lógarbundin játtan) 5.34.4.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.000 t.kr. Minninýtslan er 1.875 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 1.000 t.kr. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum er torført er at gera neyvar metingar. Frá 2002 og til 2007 hevur útgjaldið til sjúkratrygd verið støðugt millum 6,3 mió.kr. og 7,0 mió.kr.

# 5 VINNUMÁL

## 5.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (løgujáttan) | 3.200 | 5.330 | 2.130 |
| Lánsafturgjald | -2.500 | -896 | 1.604 |
| Partabrøv, ymisk viðurskifti | -6.600 | -462 | 6.138 |
| Barsilsskipanin (lógarbundin játtan) | 79.600 | 83.077 | 3.477 |
| Strandfaraskip Landsins (landsfyritøka) | 136.741 | 143.595 | 6.854 |

### 5.1.1 Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (løgujáttan) 6.37.5.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,2 mió.kr. Meirnýtslan er 2,1 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 2,8 mió.kr.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at talan er um 4. byggistig.

Tá ið 4. byggistig varð boðið út, var eingin áhugi fyri at bjóða, og einki tilboð kom inn. Samráðingar vórðu tí tiknar upp við arbeiðstakara, og úrslitið gjørdist, at útreiðslurnar til handverkarar blivu væl dýrari enn mett var frammanundan.

Bindandi sáttmáli um at gera 4. byggistig varð undirskrivaður við eitt byggifelag í november 2007. Játtanin í 2007 var 7 mió.kr. Nýttar vórðu bert 4,6 mió.kr. í 2007. Biðið varð tí um eykajáttan, 2,8 mió.kr., í 2008.

Sambært landsstýrismanninum er samlaða játtanin til umbyggingina hildin.

### 5.1.2 Lánsafturgjald 6.37.6.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 1.604 t.kr.

Vinnumálaráðið hevur áður greitt frá, at Gjaldstovan umsitur játtanina, og at talan er um lán frá grunnum, sum eru niðurlagdir.

### 5.1.3 Partabrøv, ymisk viðurskifti 6.37.6.11.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 6.600 t.kr. Minniinntøkan er 6.138 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2008 var ætlanin at selja partabrøvini í Sp/f Atlanticon, P/f Smyril Line og P/f Tjaldur í 2008.

Í 2008 eru bert partabrøvini í Sp/f Atlanticon seld. Prísurin var 462 t.kr.

Í fíggjarlógini 2009 er ongin játtan, "*tí roknað verður við, at minnilutapartabrøvini, sum landið eigur í Atlanticon, Smyril Line og Tjaldur verða seld í 2008*".

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at selja øll partabrøvini í umrøddu partafeløgunum, men tá avtornaði, vóru bert partabrøvini í Atlanticon seld. Aðrar 30 mió.kr. vórðu settar í P/F Smyril Line. Orsøkin til hesa gongd er, at heimsumfatandi fíggjarkreppan eisini rakti meint her í Føroyum, og tí er tíðin, sum er, ikki hin rætta at selja.

Sum støðan er á fíggjarmarknaðinum, eru ongar ítøkiligar ætlanir um at selja partabrøvini.

### 5.1.4 **Barsilsskipanin** (lógarbundin játtan) 6.39.4.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 79,6 mió.kr. Meirnýtslan er 3,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað kann vera trupult at meta neyvt um, hvussu nógv fara at hava rætt til útgjald úr skipanini, og hvussu stórar upphæddirnar verða (útgjaldið er tengt at inntøkuni hjá móttakaranum). Harumframt bleiv tíðarskeiðið, sum móttakarar kunnu fáa útgjald, longt í 2008, eftir at fíggjarlógin var samtykt.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at skipanin er sjálvfíggjandi, men at inntøkurnar liggja undir § 20 Fíggjarmál, meðan játtanin til Barsilsskipanina liggur undir § 6 Vinnumál.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at í 2008 vóru inntøkurnar 87,2 mió.kr. og útreiðslurnar 83,1 mió.kr.

### 5.1.5 **Strandfaraskip Landsins** (landsfyritøka) 14.38.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 136,7 mió.kr. Meirnýtslan er 6,9 mió.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 128 mió.kr. Við fíggjarnevndarskjali 10. juni 2008 varð játtanin hækkað 8,7 mió.kr., í sambandi við at Smyril skuldi í dokk, og annað skip skuldi fáast til vega til Suðuroyarleiðina.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 3,85 mió.kr.:

1. 1,15 mió.kr. í sambandi við at nýggjur sáttmáli varð gjørdur við busseigarar, sum røkja Bygdaleiðir.
2. 2,7 mió.kr. í sambandi við at semja varð gjørd í Føroya Rætti 6. oktober 2008 við Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Starvsmannafelagið og Maskinmeistarafelagið um at veita starvsfólki løn fyri skeivar halgidagar.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært ársfrágreiðingini fyri 2007 hjá stovninum eru rokningar á 3,18 mió.kr. fyri 2007 bókaðar í 2008. Flestu rokningarnar eru fyri, at Smyril var í dokk.

Nýggir sáttmálar um busskoyring (1,15 mió.kr.)

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at fáa nýggjar sáttmálar á heysti 2007, sum kundu galda frá ársbyrjan 2008, so at ein møguligur minni- ella meirkostnaður kundi koma við í fíggjarlógina 2008. Tað eydnaðist ikki, og tí varð viðmerkt í

fíggjarlógini 2008, at møguligur meirkostnaður kundi standast av nýggjum sáttmálum. Ongin peningur varð settur av til endamálið, tí tað kundi ávirka úrslitið av útbjóðingini.

Tá sáttmálarnir vóru góðkendir, og komnir í gildi um miðjan mai 2008, var framvegis eftir at samráðast við kommunurnar um skúlabarnakoyringina. Flestu avtalurnar um skúlabarnakoyring komu til sættis rættiliga skjótt, men fyri Sandoynna dró út, og hesin sáttmáli varð ikki undirskrivaður fyrr enn 24. oktober 2008. Tí varð endaligi meirkostnaðurin ikki staðfestur fyrr enn tá.

### Rættarmálið um skeivar halgidagar (2,7 mió.kr.)

Sambært landsstýrismanninum er tað eitt gamalt mál. Gerðarrætturin tók avgerð í 2003, men kravið, t.v.s. endaliga og rætta upphæddin, varð ikki kent fyrr enn 8. oktober 2008, eftir rættarsemjuna.

### Rokningar fyri dokkingina av Smyrli 2007

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Smyril var í dokk í Landskrona í oktober 2007, har nógvar stórar ábøtur vórðu framdar. Nakrar stórar rokningar blivu ikki avgreiddar og goldnar fyrr enn í 2008. Búskaparskipan Landsins var tá afturlatin fyri 2007, og rokningarnar kundu tí ikki verða bókaðar á fíggjarárið 2007.

Tá roknskapurin bleiv grannskoðaður, umbókaði grannskoðarin hesar rokningar, tilsamans 3,8 mió.kr., og tí er munur ímillum roknskapin, sum grannskoðarin hevur sett upp, og roknskapin sambært Búskaparskipan Landsins.

### Gongdin í oljuprísinum 2008

Landsstýrismaðurin vísir á, at hækkaðu oljuprísirnir á sumri 2008 eisini høvdu við sær meirnýtslu.

## 5.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 400 | 237 | 163 |
| Djóralæknatænastur (rakstrarjáttan) | 1.100 | 903 | 197 |
| Kappingarráðið (rakstrarjáttan) | 2.430 | 2.044 | 386 |
| Endurgjald til skipasmíð | 10.000 | 8.415 | 1.585 |
| Vága floghavn (landsfyritøka): | | | |
| Inntøkur | 25.500 | - | 25.500 |
| Útreiðslur | 25.500 | - | -25.500 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** |
| Vága floghavn (løgujáttan) | 4.600 | - | 4.600 |
| Flogferðsla (løgujáttan) | 2.000 | 179 | 1.821 |
| P/f Vága Floghavn, apportinnskot: | | | |
| Inntøkur | -442.500 | -414.318 | 28.182 |
| Útreiðslur | 442.500 | 414.318 | -28.182 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** |
| Umsiting av Barsilsskipanini (rakstrarjáttan) | 2.000 | 1.798 | 202 |
| Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) | 3.500 | 72 | 3.428 |

### 5.2.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 6.11.1.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 400 t.kr. Minninýtslan er 163 t.kr.

### 5.2.2 Djóralæknatænastur (rakstrarjáttan) 6.33.1.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.100 t.kr. Minninýtslan er 197 t.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 900 t.kr. Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð játtanin hækkað 200 t.kr. Sambært landsstýrismanninum steðgaði virksemið 19. desember 2008, tá upprunaliga játtanin, 900 t.kr., var brúkt.

Eykajáttanarlógin varð lýst 22. desember 2008. Sambært landsstýrismanninum varð játtanin ikki nýtt, tí bert fáir arbeiðsdagar vóru eftir av árinum.

### 5.2.3 Kappingarráðið (rakstrarjáttan) 6.37.1.17.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.430 t.kr. Minninýtslan er 386 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru størv ósett í 2008.

### 5.2.4 Endurgjald til skipasmíð 6.37.2.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.000 t.kr. Minninýtslan er 1.585 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um útreiðslurnar.

### 5.2.5 Vága floghavn (landsfyritøka) 6.38.2.08.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 25,5 mió.kr. og ein útreiðslujáttan 25,5 mió.kr. Ongar inntøkur ella útreiðslur eru í landsroknskapinum.

Tá fíggjarlógin fyri 2008 varð samtykt, var virksemið hjá Vága floghavn ikki enn lagt í P/f Vága Floghavn.

Virksemið hjá flogvøllinum var ikki lagt um til P/f Vága Floghavn fyrr enn í juli 2008, við roknskaparligum virknaði frá 1. januar 2008, smb. § 1, stk. 1, í løgtingslóg nr. 40 frá 21. mai 2008 "um at leggja virksemið hjá Vága floghavn í P/f Vága Floghavn."

Fyri at virksemið hjá Vága floghavn kundi halda fram ótarnað, til virksemið varð lagt í P/f Vága Floghavn, var neyðugt við einari rakstrarjáttan á fíggjarlógini fyri 2008.

### 5.2.6 Vága floghavn (løgujáttan) 6.38.2.09.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4.600 t.kr. Ongin peningur er brúktur.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 4.400 t.kr., tí arbeiðið at seta trygdarhegn upp kring flogvøllin og at ognartaka lendi í hesum sambandi, ikki fór at verða framt í 2008.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum er ongin peningur nýttur, tí Landsverk hevur mælt frá at gera trygdarhegnið, áðrenn vøllurin er longdur.

Friðingarmyndugleikarnir hava kravt, at grót til leingjanina av vøllinum skal fáast til vega við at spreingja sunnanfyri vøllin. Um trygdarhegn hevði verið sett upp, áðrenn tað arbeiðið var farið í gongd, hevði helst verið neyðugt at tikið hegnið á suðursíðuni niður aftur. Gjørt var tí av at bíða við at hegna, til neyðuga gróttøkan er framd.

### 5.2.7 Flogferðsla (løgujáttan) 6.38.2.13.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Minninýtslan er 1.821 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 1.500 t.kr., av tí at stundir ikki vóru at fara undir at dagføra tyrlupallin á Kirkju í 2008.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum hevur verið arbeitt við hesari verkætlan í fleiri ár.

Á heysti 2008 varð lendið ognartikið, men sambært lógini var kærufreistin 1. desember 2008.

### 5.2.8 P/f Vága Floghavn, apportinnskot 6.38.2.17.

#### Fíggjarlig heimild

Í fíggjarlógini eru játtaðar 442,5 mió.kr. til inntøkur og 442,5 mió.kr. til útreiðslur.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru inntøkurnar 414,3 mió.kr. og útreiðslurnar 414,3 mió.kr.

Endamálið við játtanini er at fáa fíggjarliga heimild til ognarinnskotið (apportinnskot) í P/f Vága Floghavn.

Vága floghavn varð yvirtikin sum føroyskt málsøki 1. mai 2007. Partafelagið Vága Floghavn varð stovnað 14. juni 2007, og endamál felagsins er at reka floghavnarvirksemi og aðra vinnu í hesum sambandi.

Virksemið hjá Vága floghavn, saman við ognum, skuld, rættindum og skyldum, skal síðani verða lagt í P/f Vága Floghavn.

### Materiel heimild

9. mai 2008 samtykti Løgtingið "uppskot til løgtingslóg um at leggja virksemið hjá Vága floghavn í P/f Vága Floghavn". Endamálið við lógaruppskotinum var at fáa til vega materiellu heimildina.

### Virðismeting

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið vórðu ognirnar í Vága floghavn virðismettar til 442,5 mió.kr. Talan var um eina fyribils meting frá P/f Grannskoðaravirkinum Inpact í september 2007, sum skal takast við fyrivarni:

1. Økið varð virðismett til 375,5 mió.kr. og fevnir um flogbreytina 308,3 mió.kr., lendið 45,2 mió.kr., og støðuplássið 22,0 mió.kr.
2. Bygningar, brunnar, reinsianlegg o.a. varð virðismett til 47,2 mió.kr.
3. Teknisk útgerð, innleggingar og bilar vórðu virðismettir til 19,8 mió.kr.

#### Ad 1.: Økið

Í fyribils virðismetingini stendur soleiðis:

> *"Samlaða lendið er, sambært fyriliggjandi upplýsingum uppá 778.478 fermetrar. Við støði í jarðarprísum hjá Búnaðarstovuni fyri stórar bygdir, har lendið er grýtut og ikki dyrkingarbært, er prísurin ásettur til kr. 58 fyri fermeturin. Lendið er við hesum fortreytum virðismett til 45,2 mió.kr.*
>
> *Verandi flogbreyt er uppá 1370 metrar. Við støði í upplýsingum um kostnaðin í sambandi við ætlaðu leingingina av vøllinum, verður mett, at verandi vøllur hevur eitt virði uppá kr. 250.000 pr. metur ella samanlagt 342,5 mió.kr. Tó verður virðismetingin lækkað viðv. gomlum dreni og kaðalføringum viðv. verandi flogbreyt.*
>
> *Støðupláss verða virðismett sambært givnum upplýsingum um virði á støðuplássum "innanfyri hegnið" - til flogførini. Við útgangsstøði í hesum upplýsingum er mett, at bilapláss kunnu ásetast til eitt virði uppá l0 mió.kr."*

#### Ad 2.: Bygningar, brunnar, reinsianlegg o.a.

Í fyribils virðismetingini stendur soleiðis:

> *"Vit hava heitt á Landsbyggifelagið um at virðismeta bygningar, sum hoyra til Vága floghavn. Niðurstøðan er, við støði í donskum fermetra-prísi, tillagaðum føroyska byggimarknaðinum, og við atliti at verandi góðsku, slag og nýttum tilfari, at ein nýgerð av bygningunum í dag, verður mett at kosta 114,7 mió.kr.*
>
> *Við útgangstøði í nær bygningarnir eru bygdir (aldur), og einum avskrivingartíðarskeiði uppá 50 ár, meta vit, at bygningarnir kunnu virðismetast til 47,3 mió.kr. Tekniskar innleggingar í sambandi við flogferðsluna og trygdareftirlit, eins og ferðafólka- og viðførisavgreiðsla er ikki tikið við í bygningsvirðið - ei heldur ymiskar leiðingar, sum liggja í lendinum (økinum), uttan um bygningarnar."*

Ad 3.: Teknisk útgerð, innleggingar og bilar

Í fyribils virðismetingini stendur soleiðis:

*"Virðismetingin tekur støði í ítøkiligum upplýsingum um:*

- *útveganarvirði í teimum førum, har talan er um íløgur, sum framdar eru nýliga,*
- *tryggingarmetingar (akfør),*
- *viðlíkahald/stand,*
- *eftirverandi nýtslutíð og nýtslumøguleikar framyvir.*

*Upphæddin uppá 19,8 mió.kr. fevnir um bilar, maskinur, amboð, innbúgv, NAV- og MET útgerð, umframt aðrar installatiónir atknýtt flogvallarvirkseminum."*

Í apríl 2008 spurdu vit, um metingin bygdi á viðurkendar meginreglur um at virðismeta tílíkar ognir.

Í juni 2008 svaraði landsstýrismaðurin, at grannskoðarafelagið, sum hevði gjørt virðismetingina, borgaði fyri, at metingin var gjørd á fullgóðan hátt.

### Frágreiðing frá landsstýrismanninum

Sambært landsstýrismanninum var virðismetingin til apportinnskotið upprunaliga 442,5 mió.kr., men talan var um eina fyribils virðismeting.

P/F Inpact hevur 24. juli 2008 gjørt eina nýggja virðismeting av ogn og skuld pr. 1. januar 2008:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Grundøki, íroknað flogbreyt | 351,0 mió.kr. |
| 2. | Bygningar, brunnar o.a. | 47,2 mió.kr. |
| 3. | Teknisk útgerð o.a. | 19,8 mió.kr. |
| 4. | Støðisogn tilsamans | 418,0 mió.kr. |
| 5. | Skuld | -3,7 mió.kr. |
| 6. | Virði tilsamans | 414,3 mió.kr. |

Broytingarnar í mun til fyribils virðismetingina eru, at jarðarprísurin er broyttur frá kr. 58 til kr. 27 fyri fermeturin, og at innskotnu fermetrarnir av matr. 427a Sørvágur eru 766.918 m$^2$ og ikki 778.478m$^2$, sum roknað varð við upprunaliga. Teir 11.560 m$^2$ av matr. 427a, Sørvágur, eru lagdir til Landsverk.

Ad 1. Grundøkið

Í fyribils virðismetingini var støðið tikið í prísinum hjá Búnaðarstovuni á jørð í stórum bygdum, har lendið er grýtut og ikki dyrkingarbært. Prísurin varð ásettur til kr. 58 fermeturin. Lendið var við hesum fortreytum virðismett til 45,2 mió.kr.

Í endaligu virðismetingini er støðið tikið í prísinum hjá Búnaðarstovuni á jørð á útoyggj og lendi millum bygda, har talan er um góða hagajørð og haga, sum kann dyrkast. Prísurin er ásettur til kr. 27 fermeturin. Lendið er við hesum fortreytum virðismett til 20,7 mió.kr.

Ad 5. Skuld

Sambært uppgerð frá Vága floghavn er rakstrarhallið 2,7 mió.kr. í tíðarskeiðinum 1. januar – 30. juni 2008. Skuldin er mótvegis landskassanum, sum hevur fíggjað virksemið nevnda tíðarskeið. Harafturat eru 1 mió.kr. avsettar til aðrar skyldur í tíðarskeiðinum 1. juli – 24. juli 2008.

### 5.2.9 Umsiting av Barsilsskipanini (rakstrarjáttan) 6.39.4.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Minninýtslan er 202 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hava útreiðslurnar til umsiting av Barsilsskipanini verið lægri, enn mett varð.

### 5.2.10 Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) 14.38.2.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.500 t.kr. At kalla ongin peningur er brúktur, og minninýtslan er 3.428 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 3.300 t.kr., tí at Strandferðslan ikki hevði funnið hóskandi skip til keyps til Fugloyarleiðina.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru kr. 71.762 nýttar til at kanna eitt skip í Svøríki fyri at vita, um tað kundi brúkast til at avloysa M/S Másan. Útreiðslurnar eru bókaðar soleiðis:

| | |
|---|---|
| StRk 1420: Umboðan | kr. 25.975 |
| StRk 1479: Keyp av tænastuveitingum | - 45.787 |
| **Tilsamans** | **kr. 71.762** |

Sundurgreiningin á standardkontur, í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, er ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til íløgu, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til íløguútreiðslur (standardkonta 31), soleiðis sum hetta útreiðsluslag er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins

Landsgrannskoðanin heldur talan vera um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av rakstrarjáttanini til Strandferðsluna.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at bókingar á kontu 1420 "umboðan" fevna um útreiðslur til ferðing og uppihald, í sambandi við at farið var til Svøríkis at hyggja eftir skipinum saman við serkønum fólki frá skipasmiðjuni Mest. Hesin kostnaður átti at verið bókaður á konto 1411 " ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands", men er av misgáum bókaður á 1420 "umboðan".

Bókingar á kontu 1479 "Keyp av tænastuveitingum" fevna um kostnaðin at fáa serkøn fólk at gjøgnumganga og kanna skipið.

Landsstýrismaðurin vísir á, at varð skipið keypt, hevði hesin beinleiðis kostnaður av verkætlanini verið partur av samlaðu løguætlanini at keypa og dagføra skipið. Tí er kostnaðurin útreiðsluførdur á hesa høvuðskontu.

Hinvegin er arbeiðstíðin og onnur umsiting, sum Strandferðslan hevur brúkt til verkætlanina, ikki tikin við her, men útreiðsluførd undir vanliga virkseminum hjá Strandferðsluni.

# 6 MENTAMÁL

## 6.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald | 5.865 | 6.062 | 197 |
| Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan) | 6.854 | 8.407 | 1.553 |
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 6.751 | 6.893 | 142 |
| Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan) | 546 | 653 | 107 |
| Stuðul til fólkaskúlar | 5.259 | 5.439 | 180 |
| Skúlin á Trøðni (løgujáttan) | 1.500 | 1.573 | 73 |
| Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | 52.000 | 61.588 | 9.588 |
| Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) | 10.100 | 11.332 | 1.232 |
| Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) | 21.500 | 23.932 | 2.432 |
| Studningur til læripláss (lógarbundin játtan) | 12.000 | 13.511 | 1.511 |
| Gjald fyri lærusáttmálar o.a | -1.190 | -954 | 236 |
| Musikkskúlar (rakstrarjáttan) | 10.596 | 10.967 | 371 |
| Klaksvíkar sjómansskúli (løgujáttan) | 700 | 809 | 109 |
| Almanna- og heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan) | 12.167 | 13.420 | 1.253 |
| Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan) | 25.163 | 25.571 | 408 |
| Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) | 1.214 | 1.476 | 262 |
| Kringvarp Føroya (landsfyritøka) | - | 3.142 | 3.142 |
| Lánsafturgjald | -100 | - | 100 |

### 6.1.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 7.11.1.14.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.865 t.kr. netto. Meirnýtslan er 197 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna, at nøkur eykaarbeiði komu afturat, sum ikki vóru við í ætlanini av fyrstan tíð, serliga viðvíkjandi Skúlanum á Trøðni, Mentamálaráðnum og Vinnuháskúlanum.

Hesi arbeiði vóru neyðug at gera fyri at lúka m.a. myndugleikakrøv. Harafturat varð ein rættuliga stór ábót gjørd á tekjuna á Skúlanum á Trøðni, sum lak. Eisini hetta arbeiðið mátti verða gjørt beinanvegin, so at skaðin ikki gjørdist størri.

### 6.1.2 Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan) 7.23.1.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.854 t.kr. netto. Meirnýtslan er 1.553 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum hevur Skúlabókagrunnurin ikki havt nóg neyva fíggjar-stýring. Leiðslan valdi í august 2008 at seta fleiri starvsfólk. Samstundis vórðu fleiri útgávur settar í gongd, har rithøvundar og myndaprýðarar vórðu samsýndir við fastari lønarflyting.

Leiðslan í Skúlabókagrunninum hevur víst á, at tað ikki hevur verið vanligt, at rithøvundar í so stóran mun hava fingið fasta lønarsamsýning, men eitt vaksandi tal av

lærarum hava havt farloyvi at skriva fakbøkur, og henda gongdin má haldast at vera komin fyri at vera. Tíðin, har rithøvundar og myndaprýðarar verða samsýndir, tá verk teirra eru liðug, er farin. Í dag verða bøkur o.a. framleiddar í neyvum samstarvi við ritstjórnina, fakbólkar, rithøvundar og myndaprýðarar.

Tað kann taka fleiri ár at framleiða skúlabøkur, og tá bøkurnar eru lidnar, verða tær í fyrsta umfari lagdar á goymslu, og verða síðani seldar so við og við. Við higartil nýttu roknskaparmeginreglu verða allar framleiðsluútreiðslurnar útreiðsluførdar, tá ið tær verða hildnar/goldnar. Tí hevur roknskapurin ikki givið rættvísandi mynd av aktivitetinum í einum roknskaparári.

Fyri at bøta um viðurskiftini, og fyri at kunna seta upp ein roknskap, ið gevur eina meira rættvísandi mynd, hevur stovnurin – við serkønari hjálp og í samráði við Gjaldstovuna – fyrireikað seg til eina nýggja skipan, ið varð tikin í nýtslu 1. januar 2009. Í nýggju skipanini er lagt upp fyri framleiðslu til at leggja á goymslu. Skipanin hevur við sær:

- neyva innanvirkis fíggjarstýring í øllum liðum,
- mannagongdir, sum tryggja fíggjarstýring í øllum liðum,
- neyva goymslustýring og
- at mánaðarligur eftirkanningarlisti tryggjar, at øll lið í fíggjarstýringini eru virkin.

Skúlabókagrunnurin framleiðir nú bøkur o.a. inn á goymslu, og útreiðslurnar verða í framtíðini ikki útreiðsluførdar í rakstrinum hjá stovninum, men verða aktiveraðar á fíggjarstøðuni, fyrst sum útgávur í gerð, og síðani, tá ið útgávan er givin út og løgd á goymslu, sum útgávugoymsla.

Í 2008 hevði grunnurin ikki umstøður at framleiða eftir hesum leisti, tí hevur meirnýtslan verið so stór. Meirútreiðslan er til "útgávur í gerð", t.v.s. bøkur, sum koma út í 2009, 2010 og 2011. Tað merkir í stuttum, at Skúlabókagrunnurin í 2008 hevur flutt 2.225 mió.kr. frá rakstri til "útgávur í gerð".

Tá ið bøkurnar verða útgivnar, og hvørt árið tær eru á sølulista (tilsamans 5 ár), verða útreiðslurnar bókaðar frá "útgávur í gerð" til “rakstrarútreiðslur”. Tá ið ein útgáva verður seld, verður framleiðslukostnaðurin drigin frá vinninginum. Samanumtikið sigur landsstýrismaðurin, at eftir hesum roknskaparhátti, fer Skúlabókagrunnurin at gjalda meira enn meirnýtsluna aftur.

### 6.1.3 **Próvtøkur** (rakstrarjáttan) 7.23.1.31.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.751 t.kr. Meirnýtslan er 142 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna:

*at* próvtøkur á Føroya Læraraskúla í skúlaárinum 2008/09 vórðu lagdar um, so at fleiri próvtøkur, sum skuldu vera í mai-juni 2009, vórðu fluttar fram til okt-des. 2008,

*at* tað ikki longur ber til at fáa uppgávur í enskum til miðnámsskúlarnar ókeypis úr Danmark, og tí er ein nevnd sett at gera føroyskar uppgávur, og

*at* landsroyndin í fólkaskúlanum í 2008 kostaði meira enn mett var.

### 6.1.4 **Eftirútbúgving og skeið** (rakstrarjáttan) 7.23.1.34.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 546 t.kr. Meirnýtslan er 107 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan ein tíðargreiningarvilla, av tí at ein rokning á 90 t.kr. varð bókað í 2008 ístaðin fyri í 2007.

### 6.1.5 Stuðul til fólkaskúlar 7.23.2.03

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.259 t.kr. Meirnýtslan er 180 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 02. Skúlabarnaflutningur | 1.400 | 1.614 | 214 |
| 03. Privatir skúlar | 3.779 | 3.815 | 36 |
| 04. Føroyskir skúlar uttanlands | 80 | 10 | -70 |
| **Tilsamans** | **5.259** | **5.439** | **180** |

Sambært landsstýrismanninum hevur rættarsak verið millum Mentamálaráðið og Kvívíkar kommunu um eina rokning í sambandi við skúlabarnaflutning. Kvívíkar kommuna vann sakarmálið, og 200 t.kr. eru tí goldnar kommununi.

### 6.1.6 Skúlin á Trøðni (løgujáttan) 7.23.2.12.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.500 t.kr. Meirnýtslan er 73 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, *"at stór nýgerð av gomlum bygningi skuldi gerast, og sera trupult var at meta so neyvt um kostnaðin."*

### 6.1.7 Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) 7.23.3.06.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 52 mió.kr. Meirnýtslan er 9,6 mió.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 48 mió.kr. Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð játtanin hækkað 4 mió.kr. til at gera skúladepilin lidnan, herímillum at gera vatnleiðing, kloakkfrárenning og til at asfaltera økið.

Sambært Ll. nr. 75/2005 við seinni broytingum "um at byggja skúladepil í Suðuroynni" kunnu byggiútreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 74 mió.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru tilsamans nýttar 95 mió.kr., svarandi til ein meirkostnað á 21 mió.kr. Vit bóðu tí landsstýrismannin um gjøllari frágreiðing.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tríggjar høvuðsorsøkir eru til frávikið:

a) 7,7 mió.kr. til innbúgv og útgerð vóru ikki við í verklagslógini,
b) 4 mió.kr. til vatn og kloakk vóru ikki við í verklagslógini, og
c) talan er harumframt um eykakrav, 9,3 mió.kr., sum byggiharrin ikki vil góðtaka.

a) Innbúgv og útgerð (7,7 mió.kr.)

Sambært landsstýrismanninum vóru útreiðslur til innbúgv og útgerð ikki við í verklagslógini.

Í juli 2009 spurdi Landsgrannskoðanin, hví stig ikki vórðu tikin til at broyta verklagslógina, og hví umbøn um eykajáttan ikki varð løgd fyri Løgtingið.

Í august 2009 hevur landsstýrismaðurin svarað, at "*útreiðslan til innbúgv og útgerð ikki varð roknað við í byggikostnaðin, men hildin sum ein serstøk útreiðsla seinasta byggiárið.*

*Sum so hoyra bæði innbúgv og útgerð til ein lidnan skúla, men tá ið fyrstu ætlanirnar um at byggja ein skúla verða gjørdar, er ilt at siga, hvussu verður við innbúgvi og útgerð. Tí verða hesar útreiðslur vanliga ikki roknaðar við í upprunaliga byggikostnaðin í einari verklagslóg, men tiknar við sum ein útreiðsla seinasta byggiárið. - Alt eftir hvussu ein bygningur verður gjørdur, má roknast við ymiskari nýtslu av innbúgvi.*"

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at landsstýrismaðurin síðani 2005 hevur vitað, at hesar útreiðslur komu afturat, og hevur havt góða tíð til at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta verklagslógina, og søkja um eykajáttan til útreiðslurnar.

b) Vatn og kloakk (4,0 mió.kr.)

Landsstýrismaðurin vísir á, at vanliga eru vatn- og kloakkveitingar ein kommunal uppgáva. Skúlin liggur uttan fyri bygt øki, og áðrenn arbeiðið at byggja skúlan fór í gongd var støða ikki tikin til, hvussu vatn- og kloakkviðurskiftini skuldu verða avgreidd.

Landsgrannskoðanin skal gera vart við, at landsstýrismaðurin síðani 2005 hevur vitað, at hesar útreiðslur komu afturat, og hevur havt góða tíð til at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta verklagslógina.

c) Eykakrav (9,3 mió.kr.)

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at í partneringavtaluni við MT Højgaard er tilskilað, at fara byggiútreiðslurnar upp um avtalaðu 74 mió.kr., rindar byggiharrin í mesta lagi 600 t.kr.

Meirkostnaður stendst ikki av, at byggiharrin, sum er Landsverk, hevur sett fram eyka krøv ella ynski til byggingina, men meirkostnaðurin liggur í vánaligari stýring og vánaligari leiðslu hjá arbeiðstakaranum. Arbeiðstakarin kunnaði ikki byggiharran um vánaligu fíggjarstøðuna, fyrr enn tað var ov seint at gera munandi sparingar.

Landsverk hevur tí avvíst at gjalda meirkostnaðin, men ein upphædd, svarandi til rokningarnar frá MT Højgaard, er støðlað, meðan bíðað verður eftir úrslitinum av møguligum sakarmáli.

Í august 2009 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk ætlar ikki at gera meira við málið, uttan so at MT Højgaard fer at seta fram krøv hesum viðvíkjandi.

Spurdur, hví stig ikki vórðu tikin til at broyta verklagslógina, og hví umbøn um eykajáttan ikki varð løgd fyri Løgtingið, hevur landsstýrismaðurin í august 2009 svarað, at Mentamálaráðið varð kunnað um tørvin so mikið seint, at ikki var møguligt at søkja um eykajáttan, men hildið varð rættast at taka hesar útreiðslur við í roknskapin 2008 fyri at geva eina rættari mynd.

### 6.1.8 **Tekniski skúli í Klaksvík** (løgujáttan) 7.23.3.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10,1 mió.kr. Meirnýtslan er 1,2 mió.kr.

Sambært Ll. nr. 63/2006 "um at veita stuðul sum rentu- og avdráttarfrítt lán til útbygging av Tekniska Skúlanum í Klaksvík" kundi stuðulin árini 2006 – 2008 í mesta lagi vera 14 mió.kr.

Sambært landsroknskapinum eru í 2006 – 2008 nýttar 19,3 mió.kr., svarandi til ein meirkostnað á 5,3 mió.kr. Vit bóðu tí landsstýrismannin um gjøllari frágreiðing.

Innbúgv og útgerð

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at innbúgv og útgerð, 3,4 mió.kr., ikki vóru við í verklagslógini.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hví stig ikki vórðu tikin til at broyta verklagslógina, og hví umbøn um eykajáttan ikki varð løgd fyri Løgtingið.

Landsstýrismaðurin hevur somu viðmerkingar, sum til løgujáttanina til "Skúladepil í Suðuroy".

Landsgrannskoðanin skal gera vart við, at landsstýrismaðurin síðani 2006 hevur vitað, at hesar útreiðslur komu afturat, og hevur havt góða tíð til at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta verklagslógina, og søkja um eykajáttan til útreiðslurnar.

Ein rokning er goldin 2 ferðir.

Ein rokning, 833 t.kr., er goldin tvær ferðir. Upphæddin er goldin inn aftur og inntøkuførd í roknskapinum fyri 2009.

Eisini er ein rokning, 305 t.kr., fyri longda byggitíð komin frá ráðgeva. Byggiharrin, sum er Landsverk, hevur avvíst at rinda meirkostnaðin. Upphæddin er støðlað, til endalig avrokning er gjørd.

### 6.1.9 Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) 7.23.3.08.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 21,5 mió.kr. Meirnýtslan er 2,4 mió.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 20,8 mió.kr. Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð játtanin hækkað 0,7 mió.kr. til at gera skúlan lidnan.

Sambært Ll. nr. 47/2005 við seinni broytingum "um at byggja fiskivinnuskúla í Vestmanna" kunnu byggiútreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 29 mió.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru tilsamans nýttar 36,3 mió.kr., svarandi til ein meirkostnað á 7,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru:

a) 4,0 mió.kr. til innbúgv og útgerð ikki við í verklagslógini, og
b) 2,5 mió.kr. meirnýtsla.

a) Innbúgv og útgerð (4,0 mió.kr.)

Sambært landsstýrismanninum vóru útreiðslur til innbúgv og útgerð ikki við í verklagslógini.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hví stig ikki vórðu tikin til at broyta verklagslógina, og hví umbøn um eykajáttan ikki varð løgd fyri Løgtingið.

Landsstýrismaðurin hevur somu viðmerkingar, sum til løgujáttanina til “Skúladepil í Suðuroy”.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at landsstýrismaðurin síðani 2005 hevur vitað, at hesar útreiðslur komu afturat, og hevur havt góða tíð til at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta verklagslógina, og søkja um eykajáttan til útreiðslurnar.

b) Meirnýtsla (2,5 mió.kr.)

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært byggiharranum, sum er Landsverk, var projektið ófullfíggjað frá fyrstan tíð, og hevur tað havt við sær nógvar projektbroytingar/eykaarbeiði og seinkingar.

Landsverk hevur avvíst at rinda partar av hesum meirútreiðslum, og tí eru 1,8 mió.kr. støðlaðar, meðan bíðað verður eftir møguligum sakarmáli.

Spurdur, hví stig ikki vórðu tikin til at broyta verklagslógina, og hví umbøn um eykajáttan ikki varð løgd fyri Løgtingið, hevur landsstýrismaðurin svarað í august 2009, at Mentamálaráðið var so mikið seint kunnað um tørvin, at ikki var møguligt at søkja um eykajáttan, men hildið varð rættast at taka hesar útreiðslur við í roknskapin 2008 fyri at geva eina rættari mynd.

### 6.1.10 Studningur til lærupláss (lógarbundin játtan) 7.23.3.14.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12.000 t.kr. Meirnýtslan er 1.511 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 2.500 t.kr.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2008 er í játtanini tikið hædd fyri, at landsstýrismaðurin ætlar at lækka endurgjaldið úr 75% til 50%.

Sambært landsstýrismanninum varð lógarbroytingin ikki framd í 2008, og tí er meirnýtsla.

### 6.1.11 Gjald fyri lærusáttmálar o. 7.23.3.15.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 1.190 t.kr. Minninntøkan er 236 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fall lærlingatilgondin munandi eftir 1. oktober 2008. Hevði lærlingatilgongdin verið støðug alt árið, hevði lærlingatalið verið 350. Samlaða lærlingatalið í 2008 endaði á 315 lærlingum.

### 6.1.12 Musikkskúlar (rakstrarjáttan) 7.23.5.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.596 t.kr. Meirnýtslan er 371 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at eingin sáttmáli hevur verið við Musikklærarafelagið síðani 2004, og peningur hevur verið støðlaður til væntaðar lønarhækkingar.

Musikkskúlin varnaðist ikki, at Føroya Gjaldstova hevði bókað eina støðlaða upphædd, 251 t.kr., inn í raksturin í februar 2008.

Við skúlaársbyrjan í august 2008 varð soleiðis meira virksemi sett í gongd, enn kostnaðurin eftir nýggja sáttmálanum frá 7. november 2008 kundi bera.

Í november 2008 vórðu lønirnar hjá musikkskúlalærarum javnaðar 37 mánaðir aftur í tíðina.

### 6.1.13 Klaksvíkar sjómansskúli (løgujáttan) 7.23.6.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Meirnýtslan er 109 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð fyrst og fremst múraraarbeiðið dýrari enn mett var, og ein rokning frá 2007 kom ikki fyrr enn í september 2008.

### 6.1.14 Almanna- og heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan) 7.23.6.11.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12.167 t.kr. Meirnýtslan er 1.253 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya | 8.428 | 8.522 | 94 |
| 21. Heilsuskúli Føroya | 3.739 | 4.898 | 1.159 |
| **Tilsamans** | **12.167** | **13.420** | **1.253** |

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 400 t.kr.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Undirkonta 20. Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 94 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan frá hækkaðum lønarútreiðslum av øktum undirvísingarvirksemi.

Undirkonta 21. Heilsuskúli Føroya
Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1.159 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er mesta meirnýtslan:

- 861.834 kr. í lønarútreiðslum til lærarar,
- 142.103 kr. í menningarátøkum, fyri at fáa skúlan á føtur í 2007.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at lærartalið vaks í 2007 og 2008 til verandi 7,75 størv. Starvsfólkatalið er líðandi økt samsvarandi økta tørvinum, nú skúlin hevur tvær útbúgvingar. Lønarútreiðslurnar til deildarleiðara vóru eisini dupultar frá januar til juli.

### 6.1.15 Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan) 7.23.6.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 25.163 t.kr. Meirnýtslan er 408 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at tól eru keypt til Náttúruvísindadeildina.

### 6.1.16 Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) 7.23.6.23.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.214 t.kr. netto. Meirnýtslan er 262 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan í stóran mun knýtt at uttanhýsis fíggjaðum verkætlanum, sum eftir ætlan skuldu fara ígongd í 2008, men sum ikki byrjaðu fyrr enn fyrst í 2009.

Eisini varð verkætlanin "Vestnordens Økonomiske Relationer" somikið seinkað, at Nordisk Ministerråd gjørdi av ikki at rinda út seinasta partin av gjaldinum til verkætlanina.

### 6.1.17 Kringvarp Føroya (Landsfyritøka) 7.24.4.06.

Í fíggjarlógini var játtanin 0 kr. netto. Meirnýtslan er 3.142 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir til ársfrágreiðingina frá Kringvarpinum:

> *"2008 er fjórða árið, ið Kringvarp Føroya ikki hevur fingið nakra hækking samsvarandi sáttmálabundnu lønarhækkingunum. Hetta merkir enn einaferð, at stovnurin er undir fíggjarligum trýsti. Neyðugar tillagingar vórðu gjørdar í 2008, men fingu tó ikki ávirkan á rakstrarúrslitið í 2008, tískil er úrslitið ikki nøktandi, men gav eitt hall upp á 3,3 mió.kr.*
>
> *Óvæntaðar útreiðslur upp á 2,2 mió.kr. ávirkaðu úrslitið. Av hesum vóru 0,85 mió.kr. settar av móti tapi, umframt íløgur fyri 1,4 mió.kr. til ljósmotor, ið fór í ódnarveðrinum í 2008, nýtt kølianlegg umframt neyðugt fibursamband millum bæði húsini. Eisini vóru eyka útreiðslur upp á 1 mió.kr. í sambandi við løgtingsvalið."*

### 6.1.18 Lánsafturgjald 7.24.8.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 100 t.kr. Ongin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at talan er um eitt lán til Tofta Ítróttafelag. Føroya Gjaldstova hevur boðað frá, at lánið er til innheintingar.

## 6.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Næmingaheim | 900 | 483 | 417 |
| Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 258.229 | 248.914 | 9.315 |
| Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) | 2.000 | 1.114 | 886 |
| Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan) | 6.216 | 5.396 | 820 |
| Ungdóms- og bygdarhús | 660 | - | 660 |
| Bygdasøvn | 3.289 | 3.054 | 235 |
| Kirkjubømúrurin (løgujáttan) | 1.000 | 749 | 251 |

### 6.2.1 Næmingaheim 7.23.1.40.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 900 t.kr. Minninýtslan er 417 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at 400 t.kr., sum vóru settar av til næmingaheim á Tvøroyri, vórðu ikki nýttar.

### 6.2.2 Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) 7.23.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 258,2 mió.kr. Minninýtslan er 9,3 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at peningur, ið var settur av til skúlatilboð til atferðartruplar næmingar og til linjugreinalestur á Læraraskúlanum, varð ikki nýttur. Eisini vóru fleiri lærarar uttan útbúgving settir sum ársvikarar. Tað gav lægri útreiðslur enn roknað var við í ráðleggingini av skúlaárinum.

### 6.2.3 Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) 7.23.3.09.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Minninýtslan er 886 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdist kostnaðurin fyri eksternu ráðgevingina til “programmeringina” lægri, enn roknað var við.

### 6.2.4 Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan) 7.23.5.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.216 t.kr. Minninýtslan er 820 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Frítíðarundirvísingin varð løgd til kommunurnar í 2008, men tað gekst strilti at fáa rættiliga gongd á arbeiðið. Fleiri kommunur brúktu minni pening, enn tær plagdu.

Onnur orsøk er, at 350 t.kr. vóru settar av til HF, sum kvøldskúlaskeið og supplering til víðari lesnað. Tað varð ikki sett í verk, tí ov fáar umsóknir komu inn.

### 6.2.5 Ungdóms- og bygdarhús 7.24.1.25.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 660 t.kr. Ongin peningur er nýttur í 2008.

Í fíggjarlógunum 2004-2006 vóru játtaðar 200 t.kr. á hvørjum ári. Í 2007 og 2008 vóru 660 t.kr. játtaðar.

Ongin peningur er nýttur árini 2004 – 2008.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini verður studningur í flestu førum veittur til áður játtaðar umsóknir. Studningurin svarar til í mesta lagi 40% av kostnaðinum. Fleiri umsóknir eru játtaðar fyri nøkrum árum síðani, men byggiætlanirnar eru útsettar, m.a. tí fíggjarviðurskiftini eru broytt.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at játtanin varð hækkað í 2007, tí Bygdarfelagið Báran í 2006 hevði fingið játtaðan stuðul til at byggja bygdarhús í Árnafirði. Stuðulin varð játtaður yvir 3 ár.

Byggingin fór tó ikki í gongd í 2007. Í apríl 2008 søkti bygdarfelagið um at fáa freistina longda, fyri at fáa stuðulin goldnan út fram til 2011, tí bygdarfelagið vildi bíða við at fara undir byggingina, til vegaføringin av nýggjum tunnli millum Klaksvík og Árnafjørð varð staðsett.

Landsverk viðmælti umsóknini, og Mentamálaráðið góðkendi umsóknina í august 2008. Aðrar verkætlanir eru til skjals, men eingin teirra hevur fingið endaliga tilsøgn um stuðul.

### 6.2.6 Bygdasøvn 7.24.3.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.289 t.kr. Minninýtslan er 235 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum verður stuðul eftir bygdasavnslógini goldin afturút.

Stuðulin í 2008 er grundaður á rakstrarroknskapirnar hjá bygdasøvnunum fyri 2007. Bygdasøvnini nýttu samlað minni, enn góðkenda ætlanin var fyri 2007.

### 6.2.7 Kirkjubømúrurin (løgujáttan) 7.24.3.23.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Minninýtslan er 251 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var ætlaða serfrøðingatænastan ikki tøk, tá ið brúk var fyri henni, og tí mátti arbeiðið útsetast til 2009, bæði avstoypingararbeiðið og bygningafornfrøðiligu kanningarnar.

Ein sakførararokning, sum er í væntu, kom heldur ikki til gjaldingar.

# 7 HEILSUMÁL

## 7.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Sjúkrakassar | 34.900 | 35.475 | 575 |
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 10.844 | 11.423 | 579 |
| Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) | 3.199 | 4.480 | 1.281 |
| Ílegusavnið (rakstrarjáttan) | 2.566 | 3.019 | 453 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 373.462 | 377.261 | 3.799 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 116.991 | 134.021 | 17.030 |

### 7.1.1 Sjúkrakassar 8.20.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 34.900 t.kr. Meirnýtslan er 575 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu útreiðslurnar til heilivág hægri, enn mett var.

### 7.1.2 Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) 8.20.2.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.844 t.kr. Meirnýtslan er 579 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru nógvar útreiðslur í sambandi við at fáa kommunulæknaavloysarar til Føroyar so sum ferðaútreiðslur, bilaleiga, trygging o.a. Eru tíðarskeiðini stutt, verða alt fleiri avloysarar, og harvið nógv hægri útreiðslur.

Um avloysarin fæst umvegis vikarstovu, skal vikarstovan eisini hava eitt gjald fyri avloysaran. Í 2008 var torført at fáa avloysarar, tí varð í fleiri førum neyðugt at brúka vikarstovur, og harvið vórðu útreiðslurnar hægri.

Landsstýrismaðurin vísir á, at av teimum 32 normeraðu størvunum eru bert 17,5 størv sett við føstum læknum. 4 størv eru og verða ikki mannað, tí høli vanta. Sostatt eru 10,5 kommunulæknastørv, ið skulu verða røkt av læknaavloysarum.

### 7.1.3 Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) 8.20.2.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.199 t.kr. Meirnýtslan er 1.281 t.kr.

Endamálið við skipanini er at útbúgva kommunulæknar til føroysku kommunulæknaskipanina. Við verandi skipan er trotið á kommunulæknum í Føroyum stórt, og komandi 4 árini verða tveir kommunulæknar útbúnir um árið.

Síðan útbúgvingarskipanin varð sett í verk, eru avgerandi broytingar hendar í skipanini, m.a. er tíðin, har hvør lækni í útbúgving skal vera úti í praktikk hjá einum kommunulækna, vorðin ein nógv størri partur av samlaðu útbúgvingartíðini.

Ein partur av meirnýtsluni stavar frá, at læknar hava verið í barnsburðar-/sjúkufarloyvi o.a., og eru síðani komnir inn aftur í skipanina.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at á heysti í 2008 vóru umleið 20 læknar í skipanini: 12 turnuslæknar, 8 kommunulæknar og 1 introduktiónslækni í einum av smáu sergreinunum (introduktiónslæknar í størru sergreinunum eru fíggjaðir sum partur av vanligu læknastørvunum á rakstrarjáttanini hjá Landssjúkrahúsinum).

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað er ein útbúgvingarbólkur, ið saman við "Sundhedsministeriet" ger av, hvussu nógvir yngri læknar kunnu koma henda vegin. Tað hevur eydnast bólkinum at fáa læknar til Føroyar.

### 7.1.4 **Ílegusavnið** (rakstrarjáttan) 8.20.2.11.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.566 t.kr. netto. Meirnýtslan er 453 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 450 t.kr. netto.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at í fíggjarlógaruppskotinum 2008, ið varð lagt fyri Løgtingið 28. september 2007, var skotið upp at játta Ílegusavninum 2.808 t.kr. netto. Lógaruppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008, ið varð lagt fyri Løgtingið 22. apríl 2008, var skotið upp at játta Ílegusavninum 2.566 t.kr. netto.

Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina ætlaði landsstýrismaðurin at hækka játtanina. Tað varð tó av ongum.

Sambært landsstýrismanninum var árið so nógv liðið, tá fíggjarlógin 2008 varð samtykt 30. mai, og høvuðsvirksemið, sum er Ættarbandsskráin, hevði longu brúkt tað mesta av játtanini, sum Ílegusavnið hevði roknað við til hetta virksemið í 2008. Harafturat eru summar verkætlanir komnar í gongd seinni enn væntað, ella eru ikki komnar í gongd enn, og tað hevur eisini havt við sær minni inntøkur.

Eisini hava fleiri trupulleikar/uppgávur verið viðvíkjandi dátuviðgerð í ættarbandsforritinum Legacy og integratiónini við Progeny megindatabasuna.

### 7.1.5 **Landssjúkrahúsið** (rakstrarjáttan) 8.20.3.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 373,5 mió.kr. Meirnýtslan er 3,8 mió.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 345,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2008 varð játtanin hækkað 28 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 373.462 | 377.388 | 3.926 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí) | - | 262 | 262 |
| 50. Inntøkufíggjað virksemi (Hoyritól) | - | -389 | -389 |
| **Tilsamans** | **373.462** | **377.261** | **3.799** |

Landsstýrismaðurin vísir til frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum um orsøkina til meir-nýtsluna:

*"Játtanargongdin seinastu árini*

*Lønarjáttanin hjá Landssjúkrahúsinum er økt øll árini. Starvsfólkatalið á sjúkrahúsinum hevur verið rættiliga støðugt, til G-bygningurin bleiv tikin í nýtslu í 2004. Lønarjáttanin bleiv tá hækkað nakað - svarandi til tann økta starvsfólkatørvin.*

*Frá 2003 til 2006 var ein lítil minninýtsla á lønarjáttanini, tó er myndin broytt í 2007 og 2008. Í 2008 er talan um eina meirnýtslu á lønarjáttanini uppá umleið 1%. Mynd 1 vísir gongdina í lønarjáttanini og lønarútreiðslunum 2003-2008 fyri Landssjúkrahúsið.*

Mynd 1: Lønarjáttan í mun til lønarnýtslu 2003-2008.




Mynd 2: Játtan til aðrar útreiðslur í mun til nýtsluna 2003-2008

*Tað sæst av myndini, at játtanin ikki er hækkað nóg nógv til at viga upp ímóti tí økta fíggjartørvinum. Tó er við eykajáttan á heysti 2008 tikin hædd fyri einum størri vøkstri í m.a. útreiðslunum til vørur til viðgerð og røkt, enn árini frammanundan.*

*Mynd 2 vísir, at aðrar rakstrarútreiðslur eru øktar nógv seinasta árið. Tað er serstakliga vørur til viðgerð og røkt, sum hevur eina sera stóra øking. Innan heilivág er vøksturin sera stórur og líkist gongdini í londunum rundan um okkum.*



## Mynd 3: Samlað játtan í mun til nýtsluna 2003-2008

*Mynd 3 vísir, at Landssjúkrahúsið í øll árini hevur havt hall. Talan er um eitt hall frá undir 1% til omanfyri 6,5% í 2007 í mun til samlaðu játtanina. Hallið í 2008 er um 1%.*




### *Meirnýtsla 2008*

*Í 2008 var meirnýtslan á undirkontu 20:"Vanligt virksemi" íalt 3,9 mió.kr. Talan var um eina meirnýtslu á lønarøkinum uppá 1,8 mió.kr., ella 0,6%, og innan annan rakstur var hallið 2,1 mió.kr.*

### a: Lønarnýtslan

*Meirnýtslan í lønum kann býtast upp í 4 partar:*

### *Vantandi lønarendurgjald í sambandi við at nýggir lønarsáttmálar vórðu gjørdir fyri serlæknar á Landssjúkrahúsinum (400 t.kr.)*

*Landssjúkrahúsið hevði í sambandi við nýggjan sáttmála fyri serlæknar budgetterað við ávísum lønarvøkstri og eftirgjaldi. Tó hevur tað víst seg, at lønarhækkanin gjørdist væl størri, enn mett var í byrjanini av 2008. Í alt sær tað út til, at Landsjúkrahúsið hevur goldið omanfyri 1 mió.kr. í lønarhækkingum í 2008 til hetta økið.*

*At upphæddin er væl hægri, enn roknað varð við, kemst av, at eftirgjaldingin var væl hægri enn væntað, og at tann prosentvísa hækkingin í sáttmálanum er nógv hægri, enn miðaløkingin, sum Landssjúkrahúsið fekk til lønarkompensatión. At samlaði virkningurin í krónum her verður gjørdur upp til at vera uml. 400 t.kr. er tí, at sparingar samstundis eru framdar við m.a. at avmarka skurðvirksemið í 2008.*

### *Útbúgving av yngri læknum (570 t.kr.)*

*Orsøkin til meirnýtsluna hjá Landssjúkrahúsinum í sambandi við útbúgving av yngri læknum er, at Landssjúkrahúsið í samráð við Heilsumálaráðið í 2008, setti tvey introstørv á røntgen sum, um rúm var fyri tí, skuldu fíggjast av kontuni "Útbúgving av yngri læknum". Tá avtornaði var ikki pláss fyri hesum, og Heilsumálaráðið metti, at Landssjúkrahúsið sjálvt átti at bera hesa útreiðsluna, sum var 570 t.kr.*

### *Lønarútgjaldingar í sambandi við ósemju (680 t.kr.)*

*Lønarútgjaldingin til portørar, sum vórðu sagdir úr starvi tíðliga í 2007, og har teir í 2008 enn vóru á lønarlistanum hjá Landssjúkrahúsinum, hava kostað íalt uml. 680 t.kr. í 2008.*

*Lønir til at dekka serøkir innan intensiv og neonetal (150 t.kr.)*

*Orsøkin til meirútreiðsluna er, at tað hevur verið trupult at manna vaktirnar við serútbúnum sjúkrarøktarfrøðingum á intensiv og neonetal deildini. Fyri at fáa hesar neyðugu funktiónirnar mannaðar við sjúkrarøktarfrøðingum við røttu førleikunum, hava serdeildirnar brúkt egnar sjúkrarøktarfrøðingar. Hetta hevur verið til yvirtíðarkostnað, fyri tað, sum var út yvir tað, sum tær vóru settar til. Ein onnur loysn kundi verið at keypt konsulentar, sum vóru serútbúnir sjúkrarøktarfrøðingar, men tann loysnin hevði kostað munandi meir.*

b: Rakstur

*Tekniska økið, herundir klárgerðing av gamla sjúkrasystraskúlanum (930 t.kr.)*

*Vegna vantandi játtan til viðlíkahald, hevur Tænastudepilin, herundir tekniska deild á Landssjúkrahúsinum, viðlíkahald um hendi av nógvum gomlum bygningum og tekniskum útbúnaði. Hesar ábøtur eru kostnaðarmiklar. Landssjúkrahúsið hevur brúkt 150.000 t.kr. til bráðneyðugar umvælingar innan HVS, 110 t.kr. til umvælingar av lyftum, 103 t.kr. til umvælingar av størri maskinum og 93 t.kr. til eftirlit og umvæling av kanningartólum.*

*Landssjúkrahúsið hevur í 2009 brúkt nakað av peningi at gera gamla sjúkrarøktarfrøðiskúlan aftur til kontórumhvørvi, eftir at útbúgvingin flutti í onnur hølir í býnum. Økispsykiatriin er flutt inn í hesi hølini. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið gjørdist 387 t.kr.*

*Goymsluskipan (300 t.kr.)*

*Landssjúkrahúsið hevði eina gamla goymsluskipan, sum ikki longur leyk krøvini, sum sett verða til eina tílíka skipan. Skipanin var heldur ikki integrerað við fíggjarskipan landsins, og vóru tað hesar orsøkirnar til, at Landssjúkrahúsið saman við Gjaldstovuni valdi at fara til eina skipan, sum var ein integreraður partur av fíggjarskipan landsins.*

*Implementeringin av hesari skipan hevur verið trupul. Landssjúkrahúsið hevur saman við Gjaldstovuni verið noytt at útseta íverksetanina av skipanini frá á heysti 2007 til á heysti 2008. Hendan longda menningartíðin hevur kostað Landssjúkrahúsinum tíð og pengar. Tað eru brúktar 300 t.kr. meira enn ætlað til hetta økið.*

*Matur og annar rakstur (900 t.kr.)*

*Aðrar útreiðslur eru dýrkaðar nógv seinasta árið – serliga matur til køkin, sum ger mat til sjúklingarnar. Hetta sæst aftur í útreiðslunum hjá Landssjúkrahúsinum til hetta økið, sum eru vaksnar væl meir, enn mett varð, tá fíggjarætlanin varð løgd.*

*Elprísurin er farin upp. Landssjúkrahúsið hevur nýtt 5,59% meira til el, 354 t.kr. í 2008 í mun til ætlanina fyri árið.”*

### 7.1.6 Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) 8.20.3.20.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 117 mió.kr. Meirnýtslan er 17 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 6,2 mió.kr. netto.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 77.796 | 90.735 | 12.939 |
| 22. Flutningur og uppihald | 21.351 | 26.452 | 5.101 |
| 23. Sjúklingahotellið Tórshavn | 12.844 | 14.937 | 2.093 |
| 24. Heimtøkur | 5.000 | 1.897 | -3.103 |
| **Tilsamans** | **116.991** | **134.021** | **17.030** |

### Undirkonta 20. "Vanligt virksemi"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 12.939 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing:

> *"Tað eru vanliga rættuliga stórar óvissur í framskrivingunum av serviðgerð uttanlands - men 2008 var serliga trupult. Heilsumálaráðið ger hvønn mánað metingar um nýtsluna, út frá ávísingunum frá yvirlæknum, flutningsútreiðslum og rokningum frá útlendsku sjúkrahúsunum – serliga úr Danmark – og grundað á søgulig tøl. Fyrstu ábendingar um, at játtanin ikki fór at halda, komu tíðliga um heystið. Besta boðið upp á meirnýtsluna fyri árið, var 6,2 mió.kr. í oktober mánaði, og var hetta upphæddin, sum umbønin um eykajáttan ljóðaði upp á.*
>
> *Ein trupulleiki í framskrivingunum í 2008 var, at rokningar og aðrar upplýsingar frá donsku sjúkrahúsunum vóru sera nógv seinkaðar. Stórar umleggingar eru gjørdar í danska heilsuverkinum og var hetta givið sum grundgevingar frá sjúkrahúsumsitingunum, tá ið Heilsumálaráðið javnan rykti. Tað var ikki fyrr enn eftir ársskiftið til 2009, at tað var greitt at meirnýtslan í 2008 fór at vera munandi hægri enn roknað hevði verið við."*

### Undirkonta 22. "Flutningur og uppihald"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 5.101 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var ein vøkstur í sjúklingaferðunum í 2008. Harumframt var talið á leigu- og ambulansuflogferðum hægri, enn roknað varð við, samstundis sum prísurin á slíkum túrum er vaksandi.

### Undirkonta 23. "Sjúklingahotellið Tórshavn"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 2.093 t.kr.

Landsstýrismaðurin sigur seg hava fingið hesa frágreiðing frá Sjúklingahotellinum:

> *"Orsøkin til meirnýtsluna stavar frá øktum virksemi, harumframt eru hølini økt við 582 m2. Nøkur starvsfólkaviðurskifti hava gjørt, at lønarútreiðslurnar hava verið fleiri, umframt at lønin hjá heilsurøktarfrøðingunum á sjúklingahotellinum vóru reguleraðar við umleið 5,5 prosentstigum.*
>
> *Talið á teimum, ið hava gist á hotellinum, hevur hesi seinastu árini verið:*

| *Ár* | *2004* | *2005* | *2006* | *2007* | *2008* |
|---|---|---|---|---|---|
| *Gistingar* | *20.128* | *20.206* | *19.640* | *21.720* | *25.506* |

> *Tað, at tað vóru fleiri enn væntað, ið búðu á hotellinum, er orsøkin til, at útreiðslurnar til mat, klæði, reingerð og flutning vóru munandi hægri, enn væntað."*

### Undirkonta 24. "Heimtøkur"

Á hesari undirkontu er ein minninýtsla 3.103 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu tvær avtalur um heimtøkuverkætlanir fingnar í lag í 2008, og vóru tær báðar við Klaksvíkar sjúkrahús. Onnur avtalan var um for- og eftirkannan og eftirviðgerð í sambandi við bløruhálskrabba og hin var um ortopediskar skurðviðgerðir (hendur, akslar og knø).

## 7.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Koppsetingar (lógarbundin játtan) | 2.880 | 2.447 | 433 |
| Heilsukanningar av barnakonum (lógarb. játtan) | 806 | 709 | 97 |
| Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) | 1.191 | 699 | 492 |
| Heilsuverkið (rakstrarjáttan) | 700 | - | 700 |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 4.931 | 4.762 | 169 |
| Lánsafturgjald | -79 | -275 | 196 |

### 7.2.1 Koppsetingar (lógarbundin játtan) 8.20.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.880 t.kr. Minninýtslan er 433 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru 1.000 t.kr. ætlaðar til at koppseta fólk eldri enn 66 ár, men færri fólk enn væntað tóku av tilboðnum.

### 7.2.2 Heilsukanningar av barnakonum (lógarbundin játtan) 8.20.1.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 806 t.kr. Minninýtslan er 97 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er talið á kvinnum, ið koma til kanningar, minkað. Sama er við talinum á føddum børnum seinastu fimm árini, sambært Hagstovuni.

### 7.2.3 Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) 8.20.1.19.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.191 t.kr. Minninýtslan er 492 t.kr.

Kunngerð nr. 88/2007 "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" kom í gildi í september 2007.

Sambært landsstýrismanninum eru ikki allir kommunulæknarnir rættiliga farnir í gongd við at kanna skúlabørnini. Skipað fer at verða fyri skeiðum fyri kommunulæknunum, og roknað verður við, at sum frálíður fara fleiri skúlabørn at verða kannað.

### 7.2.4 Heilsuverkið (rakstrarjáttan) 8.20.3.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Eingin peningur er brúktur.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 450 t.kr., tí tað hevði tikið longri tíð enn ætlað at seta stjóra fyri Heilsuverkið. Roknað varð við, at stjórin fór at verða settur seinni í 2008.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at skipa øll trý sjúkrahúsini, Serviðgerðina, Barnatænastuna, Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Talgildu heilsuskipanina og Kommunulæknaskipanina undir Heilsuverkinum samsvarandi álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk.

Játtanin í 2008 varð ætlað at skipa virksemið á stovninum. Arbeiðið dró út, og undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri 2009, fall játtanin til stovnin burtur. Sostatt er ætlanin at skipa Heilsuverkið undir einum stjóra slept.

### 7.2.5 Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) 8.20.4.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4.931 t.kr. Minninýtslan er 169 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2009 boðað frá, at hóast Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi hevði eina minninýtslu í 2008, hevur stovnurin gjørt vart við at hann hevur tørv á peningi at rinda skuld, ið er frá tíðini tá ið stovnurin fekk stuðulsjáttan. Heilsumálaráðið hevur vent sær til Gjaldstovuna og Fíggjarmálaráðið fyri at finna eina loysn, men enn er ikki komið á mál í hesum spurningi.

### 7.2.6 Lánsafturgjald 8.20.5.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 79 t.kr. Meirinntøkan er 196 t.kr.

Talan er um afturgjald av lánum, sum kommunurnar hava fingið í sambandi við, at heilsumiðstøðir eru blivnar bygdar.

Sambært landsstýrismanninum vórðu gjøldini, ið vóru eftir av lánsskuldini, goldin í 2008.

## 7.3 Út- og umbygging, viðlíkahald og renovering av Lands-sjúkrahúsinum

Útreiðslur 2008

Í 2008 eru nýttar 34,7 mió.kr.

Sambært Ll. nr. 40/2006 "um at høvuðsumvæla og nútíðargera Landssjúkrahúsið" kunnu útreiðslurnar fyri verkætlanina í 2006 – 2008 í mesta lagi vera 105 mió.kr.

Sambært landsroknskapinum eru í 2006 – 2008 nýttar 104,96 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til løgtingslógina er talan um eina yvirskipaða raðfesting, har tað er størri vissa um ætlaða virksemið. Íløguætlanin skal verða endurskoðað árliga, og tað kann hugsast, at raðfestingarnar koma at verða nakað øðrvísi, sum frálíður:

1. Gera eitt kirurgiskt ambulatorium og skopieind á gomlu skurðgongini.
2. Byggja ein sterilsentral.
3. Høvuðsumvæla og umbyggja psykiatrisku bygningarnar.
4. Ávegis umvæla og flyta verandi funksjónir í høvuðsbygninginum
5. Gera klimaskerm til høvuðsbygningin
6. Byrja at umvæla tænastubygningarnar (køkur, vaskarí, goymsla, teknikkur, fyrisiting).
7. Høvuðsumvæla A-bygningin, har millum annað føðideildin er í dag.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 1,4 mió.kr. nýttar í 2008 til innbúgv, sum til dømis: stólar, reólir, borð o.tl.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður onki nevnt um innbúgv, og vit bóðu tí landsstýrismannin um gjøllari frágreiðing.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað hevur verið vanligt, í sambandi við slíkar verklagslógir, at positivar viðmerkingar hava staðið í lógini, um hon ikki fevndi um innbúgv og útgerð.

Eingin tílík viðmerking var í sambandi við játtanirnar til út- og umbyggingarnar á Landssjúkrahúsinum.

Í út- og umbyggingini, sum er framd seinastu árini, hevur eingin "serlig játtan" verið til útgerð og innbúgv, og tí hava útgerðin og innbúgvið verið roknað sum ein natúrligur partur av verkætlanini.

### Søguliga gongdin 1988 - 1997

Við løgtingslóg nr. 57 frá 19. juni 1988 "um útbygging av sjúkrahúsunum" varð heimild givin at fremja útbyggingar innan sjúkrahúsverkið.

Sambært lógini vórðu samlaðu útbyggingarætlanirnar mettar til 370 mió.kr. við príslegu 1. januar 1988. Av teimum vórðu 180 mió.kr. settar av til Landssjúkrahúsið.

Landsstýrið setti eina bygginevnd fyri Landssjúkrahúsið, og í januar 1991 legði hon fram dispositiónsuppskot fyri landsstýrið. Har vóru ætlanir um at byggja tveir nýbygningar í 4 hæddum og taka fyribilsbarakkina, ið varð bygd í 1962, niður, tí hon var ov vánalig til sjúklingar.

Stutt aftaná, í mars 1991, sendi táverandi landsstýrismaður í heilsumálum bygginevndini fyri Landssjúkrahúsið skriv, har hann vísti á, at landsstýrið hevði samtykt at steðga projektinum um útbygging av Landssjúkrahúsinum fyribils í tvey ár, hetta av vánaligu fíggjarstøðu, sum var í landinum.

### Út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum 1998 – 2005

Ikki fyrr enn í 1998 byrjaði útbyggingin. Í fíggjarlógini 1998 vóru játtaðar 8 mió.kr. til útbygging. Í eykajáttanarlógini oktober 1998 varð játtanin lækkað 2 mió.kr. Nýtslan var 5,1 mió.kr.

Til umbygging av Landssjúkrahúsinum vóru játtaðar 2 mió.kr., ið allar vórðu brúktar.

Í fíggjarlógini 1999 vóru játtaðar 14 mió.kr. til útbygging. Nýtslan var 10,2 mió.kr. Til umbygging vóru játtaðar 4 mió.kr. Nýtslan var 3,8 mió.kr.

Í fíggjarlógini 2000 vóru játtaðar 10 mió.kr. til út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður m.a. soleiðis greitt frá:

> *"Út- og umbyggingin av Landssjúkrahúsinum*
>
> *Kostnaðurin fyri samlaðu útbyggingina og samanbyggingina við verandi sjúkrahús er mettur til 153,6 mió.kr. v.mvg og 122,9 mió.kr. u.mvg. Fyri at geva rúm fyri neyðugum íløgum er roknað við, at arbeiðið verður liðugt ultimo ár 2003, hóast ynskiligt hevði verið at stytt byggitíðina við hálvum øðrum ári, soleiðis at arbeiðið varð liðugt medio ár 2002.*
>
> *Kostnaðurin fyri umbyggingina av B-bygninginum er mettur til 55,0 mió.kr. v.mvg og 44,0 mió.kr. u.mvg. Roknað verður við, at tað arbeiðið er liðugt í seinasta lagi ultimo ár 2006.*
>
> *Tilsamans er mett, at samlaða byggiætlanin fyri Landssjúkrahúsið fer at kosta 208,6 mió.kr. v.mvg og 166,9 mió.kr. u. mvg."*

Í eykajáttanarlógini mars 2000 varð játtanin hækkað 3,3 mió.kr. Nýtslan 2000 varð 12,4 mió.kr.

Í fíggjarlógunum 2001 - 2005 vóru játtaðar 210,1 mió.kr. og nýttar 206,4 mió.kr. Viðmerkingarnar til játtanirnar vóru stórt sæð endurtøkur av viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2000.

Fyrstu ferð Løgtingið varð kunnað um, at útreiðslur til tól og innbúgv ikki hava verið innroknaðar í teimum játtanum, ið Løgtingið hevur veitt til íløgur í nýggja bygningin á Landssjúkrahúsinum, var í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2002.

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina fyri 2003 varð Løgtingið kunnað um, at neyðugt var at keypa útgerð fyri 44 mió.kr.

## Umvæling og viðlíkahald av landssjúkrahúsinum

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2000 verður soleiðis greitt frá:

*"Umvæling av B-bygningshópinum*

*Tað hevur leingi verið kent, og grundaður mistanki hevur verið um, at bygningarnir, ið hoyra til Landssjúkrahúsið, eru í ringum standi. Byrjað varð at umvæla nakað fyri 13 árum síðani, men hetta arbeiðið steðgaði upp vegna væntandi pening. Ein kanning[1] varð sett í verk í fjør av B-bygninginum, og úrslitið av hesari kanning váttaði henda mistanka. Bæði bygningarnir og installatiónirnar krevja stórar ábøtur, nakrar so álvarsligar, at okkurt má gerast heilt skjótt.*

*Ætlanin var at byrja í 2000, og so halda áfram øll árini fram til ár 2006, tá alt arbeiðið skuldi verið liðugt. Umvælingin av B-bygninginum er mett til íalt 55,0 mió.kr. v. mvg og 44 mió.kr. u.mvg. Ongin játtan er sett av til endamálið í 2000.*

*Umvæling av øðrum bygningum*

*Allir hinir bygningarnir verða í løtuni kannaðir, og áðrenn nakað úrslit fyriliggur, er trupult at meta um kostnaðin av at seta teir í stand. Leysliga mett, verður samlaði kostnaðurin um 167,0 mió.kr. v.mvg og 133,6 mió.kr. u.mvg.*

*Roknast má við, at nakrar av umvælingunum eru rættliga átrokandi, og tí má ikki ov long tíð ganga, áðrenn farið verður undir hetta arbeiðið. Eftir ætlanini verður byrjað í 2003, og hildið verður fram øll árini fram til 2010, tá alt arbeiðið er liðugt.*

*Viðlíkahald*

*Roknast má við einum munandi viðlíkahaldsarbeiði, so bygningarnir ikki forfella uppaftur meira. Eisini má roknast við einum væl skipaðum viðlíkahaldsarbeiði, eftir at bygningarnir eru umvældir, soleiðis at tað ikki aftur verður komið í somu støðu, sum nú.*

*Leysliga mett kann roknast við, at viðlíkahaldsarbeiðið tey komandi árini kemur at kosta umleið 12,0 mió.kr. v.mvg og 9,6 mió.kr. u.mvg. um árið. Ongin serstøk játtan er sett av til endamálið."*

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2001 verður Løgtingið m.a. kunnað um:

*"Samlaði kostnaðurin av at umvæla allar bygningarnar á Landssjúkrahúsinum er mettur til 208,0 mió.kr.[2] Tað verður ikki mett, at pláss er fyri týðandi umvælingum innan fyri tann játtaða karmin.*

---

[1] Støðufrágreiðing I, januar 1999

[2] Støðufrágreiðing II, februar 2000

*Roknast kann við, at viðlíkahaldsarbeiðið tey komandi árini kemur at kosta umleið 68,0 mió.kr. Ongin serstøk játtan er sett av til endamálið."*

Í fíggjarlógunum 2002 - 2005 vóru viðmerkingarnar viðvíkjandi umvæling og viðlíkahaldi av Landssjúkrahúsinum stórt sæð endurtøka av viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2001.

Roknskapartøl út- og umbygging 1998 - 2005

Sambært Búskaparskipan Landsins hava útreiðslurnar til at út- og umbyggja Landssjúkrahúsið árini 1998 – 2005 verið um 240 mió.kr.

Landsgrannskoðanin heldur, at Løgtingið hevur ikki verið nóg væl kunnað um samlaða kostnaðin.

Eftir okkara tykki átti ein verklagslóg at verið løgd fyri Løgtingið, áðrenn farið varð undir prosjektering, útgrevstur og planering. Onki veruligt orðaskifti um út- og umbygg-ingina av Landssjúkrahúsinum var í Løgtinginum árini 1998 - 2005, og Løgtingið fekk í roynd og veru ikki høvi at taka støðu til prosjektið.

Renovering, umvæling og viðlíkahald

Í støðufrágreiðingini frá februar 2000 verður kostnaðurin fyri at umvæla nakrar bygningar mettur til 164 mió.kr. Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2001 verður kunnað um, at samlaði kostnaðurin at umvæla allar bygningarnar á Landssjúkrahúsinum er mettur til 208,0 mió.kr.

Eftir okkara tykki áttu støðufrágreiðingarnar frá 1999 og 2000 at verið lagdar fyri Løgtingið. Onki veruligt orðaskifti um at renovera, umvæla og viðlíkahalda Landssjúkrahúsið hevur verið í Løgtinginum, og Løgtingið fekk í roynd og veru ikki høvi at taka støðu til støðufrágreiðingarnar og kostnaðin.

Gongdin 2006 – 2015

Ikki fyrr enn 3. mars 2006 legði landsstýrismaðurin fram uppskot til løgtingslóg um at høvuðsumvæla og nútíðargera Landssjúkrahúsið fyri 105 mió.kr. árini 2006 – 2008. Uppskotið varð samtykt 21. apríl 2006.

Í almennu viðmerkingunum í uppskotinum til løgtingslógina stendur m.a.:

*"Í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2004 fór nærum øll orkan til nýggja bygningin, sum hevði við sær, at rúmd var ikki fyri grundleggjandi høvuðsumvæling og nútíðargerð av gomlu bygningunum. Eftir stendur, at framhaldandi høvuðsumvæling av gomlu bygningunum er meira átrokandi enn nakrantíð.*

*Íløguætlanin umfatar samlaðu útinningina av endurskoðaðu byggiætlanini hjá Landssjúkrahúsinum í tíðarskeiðinum frá 2006 til 2015. "*

Sostatt varð staðfest, at einki skipað viðlíkahald hevur verið av Landssjúkrahúsinum í mong ár, hóast góðar tíðir í Føroyum.

Nýtslan 2006 – 2008 var 105 mió.kr.

Í desember 2008 samtykti Løgtingið Ll. nr. 129/2008 "um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið", sum heimilar landsstýrismanninum at nýta 150 mió.kr. til endamálið í 2009-2012.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið verður íløgan árini 2012 – 2015 mett til 200 mió.kr.

Sum víst á frammanfyri eru 345 mió.kr. nýttar árini 1998 – 2008 til at út- og umbyggja, umvæla, viðlíkahalda og nútíðargera Landssjúkrahúsið.

Tá ið verkætlanin væntandi verður liðug í 2015, verður mett, at samlaðu útreiðslurnar árini 1998 – 2015 til at út- og umbyggja, viðlíkahalda, høvuðsumvæla og nútíðargera Landssjúkrahúsið verða um 700 mió.kr.

## Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Landsstýrismaðurin vísir á, at :

*"Á vári í 2000 var eitt fult ringbind (avritað á báðum síðum) latið øllum løgtings- og landsstýrisfólkunum, ið tá sótu. Í fundarfrágreiðingum frá bygginevndini sæst, at fundir hava verið við landsstýrið um hesa tíð.*

*Í tilfarinum, ið var latið løgtingslimunum var tilfar viðvíkjandi Landssjúkrahúsinum viðvíkjandi útbygging, umbygging og umvæling og innihelt:*

- *Eitt inngangsskriv dagfest 23. mars 2000*
- *Dispositiónsuppskot II*
- *Dispositionsuppskot III*
- *Dispositiónsætlan*
- *Byggiprogramm, februar 1999*
- *Byggiætlan mai 1999*
- *Projektuppskot juni 1999*
- *Myndugleikaprojekt oktober 1999 ÁW*
- *Endaligt uppskot til innrætting mars 2000 ÁW*
- *Traffikanalyse og vurderinger vedrørende trafikkforhold i forbindelsen med etablering af nybygning G – VSÓ 1. december 1998*
- *Granskning af Projektuppskot i uge 35*
- *Kanningarferð oktober 1998*
- *Kanningarferð februar 1999*
- *Kanningarferð mai 1999*
- *Kanningarferð februar 2000*
- *Støðufrágreiðing januar 1999, LBF, ráðgevandi verkfrøðingar*
- *Støðufrágreiðing II Bind I, februar 2000*
- *Støðufrágreiðing II, fylgiskjøl, februar 2000*
- *Rapport vedrørende vurdering af Landssygehusets brandsikring og brandsikkerhed i bygningerne A, B og C samt hovedtunnel*

*Sostatt metir landsstýrismaðurin, at Løgtingið er væl kunnað um ætlanina.*

*Í oktober mánaði í 2005 var ein framløga fyri politikarum í Almanna- og Heilsumálaráðnum, sum tað kallaðist tá, og var tann endurskoðaða byggiætlanin frá september 2005 løgd fyri teir tá. Henda byggiætlan var eisini løgd við uppskotinum til verklagslóg, sum varð løgd fyri tingið á vári í 2006."*

## Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Landsgrannskoðanin veit, at ein rúgva av tilfari hevur verið latið øllum løgtings- og landsstýrisfólkunum í 2000.

Eingin verklagslóg varð tó løgd fyri Løgtingið, áðrenn farið varð undir prosjektering, útgrevstur og planering. Onki veruligt orðaskifti um út- og umbyggingina av Landssjúkrahúsinum var tí í Løgtinginum árini 1998 - 2005, og Løgtingið fekk í roynd og veru ikki høvi at taka støðu til prosjektið.

Landsgrannskoðanin kann leggja aftrat, at í viðmerkingunum til fíggjarlógina og á annan hátt er Løgtingið seinastu mongu árini kunnað um, at skiftandi samgongur hava raðfest nýbygging/útbygging av sjúkrahúsverkinum framum grundleggjandi viðlíkahald.

Nevnt kann verða, at á landsstýrisfundi 11. september 2000 luttóku bygginevndarformaðurin og tekniski ráðgevin hjá bygginevndini fyri útbyggingini á Landssjúkrahúsinum. Teir vórðu bidnir um at grundgeva fyri metta íløgutørvinum á Landssjúkrahúsinum. Teir vístu m.a. á, at tá tað nú var skjalfest, at Landssjúkrahúsið hevði so átrokandi ábøtur fyri neyðini, kundi ikki verða sæð burtur frá vandanum fyri, at tað komu bráðfeingis støður, ið kundu hava við sær, at virksemið steðgaði.

Sambært fundarfrásøgnini frá formanninum í bygginevndini svaraði løgmaður, at í slíkum førum kundi neyðug játtan verða fingin til vega við eykafíggjarlóg og fíggjarnevndarskjali. Hesum sjónarmiði søgdu hinir landsstýrismenninir seg vera samdar í.

Sambært fundarfrágreiðingini vildi tað so sjálvandi ført við sær, at ábøturnar, ið fóru at verða gjørdar á Landssjúkrahúsinum komandi árini, ikki fóru at verða gjørdar eftir nakrari fastari ætlan, men heldur so hvørt sum trupulleikarnir stungu seg upp. Tað vil siga, at eingin planløgd renovering fór í gongd á Landssjúkrahúsinum.

Landsgrannskoðanini kunnugt var inntil á vári 2006 einki veruligt orðaskifti í Løgtinginum um at renovera, umvæla og viðlíkahalda Landssjúkrahúsið. Løgtingið fekk í roynd og veru ikki høvi at taka støðu til støðufrágreiðingarnar frá 1999 og 2000 og til kostnaðin.

# 8 ALMANNAMÁL

## 8.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Barnavernd (lógarbundin játtan) | 4.000 | 6.018 | 2.018 |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 7.950 | 8.900 | 950 |
| Eldrarøkt (rakstrarjáttan) | 314.510 | 315.305 | 795 |
| Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) | 10.900 | 13.943 | 3.043 |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 135.950 | 150.015 | 14.065 |
| Fólkapensjón (lógarbundin játtan) | 386.400 | 392.635 | 6.235 |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 228.350 | 237.820 | 9.470 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan) | 24.000 | 24.600 | 600 |

### 8.1.1 **Barnavernd** (lógarbundin játtan) 8.21.3.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4.000 t.kr. netto. Meirnýtslan er 2.018 t.kr. netto.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 1.810 t.kr. netto.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina vórðu alt fleiri børn við serligum tørvi flutt á stovn í Danmark, tí hildið var ikki, at nøktandi stovnspláss vóru í Føroyum.

Harumframt hevði Almannastovan í 2008 fingið rokning frá danskari kommunu, 1,2 mió.kr., fyri útreiðslur, sum vóru hildnar í 2007.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið umleið 200 t.kr.

### 8.1.2 **Stuðul til uppihaldspening** (lógarbundin játtan) 8.21.3.0.5

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.950 t.kr. Meirnýtslan er 950 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 541 t.kr.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2008 varð í játtanini tikið hædd fyri, at landsstýrismaðurin seinni í 2008 ætlaði at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta stuðulin frá 50% til 40%.

Einki uppskot varð tó lagt fyri Løgtingið í 2008.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið 409 t.kr.

### 8.1.3 **Eldrarøkt** (rakstrarjáttan) 8.21.6.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 314,5 mió.kr. Meirnýtslan er 0,8 mió.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 309,1 mió.kr. Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð játtanin hækkað 5,4 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Røktarheim | 185.195 | 186.818 | 1.623 |
| 23. Eldrarøkt í Sandoynni | 12.124 | 12.128 | 4 |
| 25. Heimatænastan | 115.560 | 114.884 | -676 |
| 27. Økisterapi | 1.631 | 1.475 | -156 |
| **Tilsamans** | **314.510** | **315.305** | **795** |

Undirkonta 20. "Røktarheim"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,6 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tá landsroknskapurin 2008 var latin aftur, og roknskapirnir hjá sjálvsognarstovnum skuldu stemmast av við innsendu rapporteringarskjølini frá sjálvsognarstovnunum, vísti tað seg, at fleiri manglar vóru í rapporteringunum.

Tað hevði við sær, at framrokningin, sum Nærverkið upprunaliga hevði gjørt, ikki helt, og at roknskapurin vísti størri nýtslu, enn fráboðað var. Sambært Nærverkinum er tað ein av trupulleikunum, sum Nærverkið hevur av at hava ábyrgd av eftirlitinum við fíggjarligu gongdini hjá sjálvsognarstovnunum.

### 8.1.4 **Ansingarsamsýning** (lógarbundin játtan) 8.21.6.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.900 t.kr. Meirnýtslan er 3.043 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 2.719 t.kr., vísandi til, at 17 fleiri brúkarar vóru í skipanini í 2008 enn í 2007.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið 324 t.kr.

### 8.1.5 Vanlig Forsorg (lógarbundin játtan) 8.21.7.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 136 mió.kr. Meirnýtslan er 14,1 mió.kr. Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 10,3 mió.kr.:

t.kr.

| Undirkonta | Uppskot eykajáttan |
|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | -105 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 1.155 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 9.100 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 1.813 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | -1.650 |
| **Tilsamans** | **10.313** |

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eyka-játtanina varð samtykt.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 13.200 | 13.649 | 449 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 1.350 | 1.104 | -246 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 2.250 | 3.541 | 1.291 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 26.100 | 28.333 | 2.233 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 28.800 | 40.462 | 11.662 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 50.400 | 51.453 | 1.053 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 8.000 | 8.167 | 167 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 5.850 | 3.306 | -2.544 |
| **Tilsamans** | **135.950** | **150.015** | **14.065** |

Undirkonta 03. "Stakútreiðslur § 15"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum metti Almannastovan í august 2008 og aftur í oktober/november 2008, at nýtslan fór at verða á leið sum játtanin. Síðstu mánaðirnar í 2008, eftir at eykajáttanarumbønin var løgd fyri Løgtingið, hækkaðu útreiðslurnar munandi. Talan var um munandi vøkstur í mun til fyrstu 10 mánaðirnar av árinum og eisini samanborið við sama tíðarskeið í 2007.

Undirkonta 04. "Meirútreiðslur brekað barn § 17"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 2,2 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin 1,2 mió.kr. verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið umleið 1 mió.kr., sum m.a. kemst av, at útreiðslurnar síðst í árinum vórðu hægri, enn mett var.

Útreiðslurnar á kontuni "Meirútreiðslur brekað barn § 17" eru hækkaðar nógv, og niðan fyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2000-2008[3]:

t.kr.

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurgjald fyri inntøku-miss | 4.891 | 5.403 | 6.271 | 6.207 | 6.502 | 9.131 | 9.241 | 10.021 | 11.239 |
| Heilivágur | 2.489 | 3.875 | 3.859 | 3.958 | 4.150 | 5.464 | 4.922 | 5.142 | 6.881 |
| Annar stuðul | 3.723 | 3.888 | 4.254 | 4.496 | 5.531 | 5.842 | 6.323 | 8.383 | 10.213 |
| **Tilsamans** | **11.103** | **13.166** | **14.384** | **14.661** | **16.183** | **20.437** | **20.486** | **23.546** | **28.333** |

Útreiðslurnar eru hækkaðar úr 11,1 mió.kr. í 2000 til 28,3 mió.kr. í 2008, ella nærum trífaldaðar.

### Undirkonta 05. "Endurbúgving § 18"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 11,7 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina eru útreiðslur til skipanina við vardum størvum, og útreiðslur til uppihald á stovnum í Danmark hækkaðar.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin 9,1 mió.kr. verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið umleið 2,6 mió.kr., sum m.a. kemst av, at útreiðslurnar seinast í árinum vórðu hægri, enn mett var.

Útreiðslurnar til "Endurbúgving § 18" eru hækkaðar nógv, og niðan fyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2000-2008:

t.kr.

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurbúgving § 18 | 15.745 | 17.589 | 18.314 | 15.471 | 20.716 | 22.251 | 24.637 | 26.369 | 40.462 |

Talvan vísir, at útreiðslurnar eru hækkaður úr 15,7 mió.kr. í 2000 til 40,5 mió.kr. í 2008, ella nærum trífaldaðar.

### Undirkonta 06. "Hjálparamboð v.m. § 18"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,1 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina er kostnaðarstøðið sum heild hægri, serliga fyri heilivág.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin 1,8 mió.kr. verið gingin á møti, hevði minninýtslan verið umleið 0,7 mió.kr.

Útreiðslurnar til "Hjálparamboð v.m. § 18" eru hækkaðar nógv, og niðan fyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini árini 2000-2008:

[3] Útreiðslurnar til stuðlar hjá brekaðum børnum eru ikki tiknar við, tí tær vórðu í 2006 fyri ein part lagdar til kommunurnar og fyri ein part lagdar í eina rakstrarjáttan á høvuðskontu 8.21.3.08. "Børn og ung: Stuðlar til børn".

t.kr.

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kostískoyti o.a. | 774 | 1.021 | 1.184 | 1.469 | 1.647 | 1.838 | 2.319 | 2.788 | 3.286 |
| Heilivágur | 3.595 | 3.622 | 6.622 | 6.244 | 6.068 | 6.470 | 6.732 | 6.035 | 7.030 |
| Tannviðgerð | 823 | 1.158 | 571 | 686 | 872 | 868 | 992 | 1.152 | 1.408 |
| Protesur | 926 | 1.165 | 1.046 | 1.109 | 1.255 | 1.573 | 1.394 | 1.546 | 985 |
| Ortopediskur fótbúnaður | 855 | 758 | 1.563 | 1.320 | 1.583 | 2.036 | 2.498 | 2.500 | 2.819 |
| Hoyritól | 6.778 | 4.779 | 4.343 | 9.443 | 5.926 | 6.218 | 6.950 | 7.101 | 3.573 |
| Bústaðarbroytingar | 1.433 | 1.273 | 2.589 | 2.592 | 2.772 | 2.825 | 1.525 | 4.039 | 2.983 |
| Avlamisbilar | 1.855 | 2.197 | 4.197 | 5.089 | 2.086 | 2.086 | 2.887 | 5.048 | 7.012 |
| Koyristólar | 1.182 | 1.900 | 2.241 | 3.870 | 2.439 | 3.078 | 2.697 | 3.848 | 1.964 |
| MVG | - | 1.632 | 2.494 | 3.757 | 2.773 | 2.571 | 2.237 | 3.114 | 3.319 |
| Annar stuðul | 8.675 | 8.023 | 10.362 | 12.811 | 12.879 | 12.426 | 13.533 | 14.281 | 17.074 |
| **Tilsamans** | **26.896** | **27.528** | **37.212** | **48.390** | **40.300** | **41.989** | **43.764** | **51.452** | **51.453** |

Talvan vísir, at útreiðslurnar eru hækkaðar úr sløkum 27 mió.kr. í 2000 í góðar 51 mió.kr. í 2008, ella nærum tvífaldaðar.

### 8.1.6 **Fólkapensjón** (lógarbundin játtan) 8.21.8.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 386,4 mió.kr. Meirnýtslan er 6,2 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 6,7 mió.kr. vísandi til, at talið á pensjónistum var hægri, enn upprunaliga mett.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði minninýtslan verið 0,5 mió.kr.

### 8.1.7 **Fyritíðarpensjón** (lógarbundin játtan) 8.21.8.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 228,4 mió.kr. Meirnýtslan er 9,5 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 9,8 mió.kr., vísandi til m.a. at talið á fólki, sum fáa hægstu og miðal fyritíðarpensjón, er økt.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði minninýtslan verið 0,3 mió.kr.

### 8.1.8 **Viðbót til ávísar pensjónistar** (lógarbundin játtan) 8.21.8.13.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 24 mió.kr. Meirnýtslan er 600 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at hækka játtanina 569 t.kr., vísandi til at fleiri pensjónistar hava eina lægri inntøku, og tí eru tað fleiri, sum fáa viðbót.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið 31 t.kr.

### 8.1.9 Viðmerkingar um meirnýtslu/eykajáttan

Í skrivi 7. juli 2008 bað Almannamálaráðið Almannastovuna meta um nýtsluna á lógarbundnum veitingum fyri 2008.

Í skrivi 8. august 2008 bað Almannastovan um eykajáttan til tær flestu lógarbundnu veitingarnar, samanlagt um 35 mió.kr. Almannastovan hevði mett um samlaðu útreiðslurnar við støði í teimum fyrstu 7 mánaðunum í 2008, og har endaligu bókingarnar fyri juli 2008 ikki vóru lidnar, var støðið 6 mánaðir.

Í telduposti 19. august 2008 til Fíggjarmálaráðið spurdi Almannamálaráðið, nær umbøn um eykajáttan skuldi verða latin Fíggjarmálaráðnum.

Sambært Fíggjarmálaráðnum finst einki skrivligt svar, tí tað varð avgreitt í telefonsamrøðu.

Í telduposti 7. oktober 2008 til øll landsstýrisfólk og aðalráð boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at ætlanin var at fáa eykajáttanarlógina lagda fyri Løgtingið sum skjótast.

Í telduposti 10. oktober til Fíggjarmálaráðið sendi Almannamálaráðið eina fyribilsútgávu av eykajáttanarumbønini fyri Almannamál, og sambært Fíggjarmálaráðnum er tað fyrsta ferð, at Fíggjarmálaráðið verður kunnað um, hvørjar játtanir á almannaøkinum fyri 2008 ikki fara at halda.

Eykajáttanarlógin varð løgd fram 25. november 2008. Flestu eykajáttanir tók Fíggjarnevndin ikki undir við, og vísti m.a. á, at fleiri umbønir ikki luku treytirnar í stýrisskipanarlógini, har staðfest verður, at ongin útreiðsla kann verða hildin uttan játtan í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Eitt broytingaruppskot frá Fíggjarnevndini um at strika flestu eykajáttanarnir í uppskotinum varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at høvdu eykajáttanirnar á almannaøkinum verið gingnar á møti, høvdu meirnýtslurnar verið væl lægri.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at samskiftið millum Almannamálaráðið og Fíggjarmálaráðið hevur verið nøktandi í hesum málum. Eftir okkara tykki átti Almannamálaráðið at havt kunnað Fíggjarmálaráðið fyrst í august 2008 um, at tørvurin á eykajáttan á almannaøkinum var um 35 mió.kr.

Undir “Formlig viðurskifti” á s. 9 er gjøllari greitt frá arbeiðsgongdini viðvíkjandi eykajáttanum seinna hálvár 2008.

## 8.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 5.574 | 3.730 | 1.844 |
| KT-heildarskipan til Almannastovuna (rakstrarjáttan) | 3.200 | 2.361 | 839 |
| Barnaískoyti (lógarbundin játtan) | 2.000 | 1.478 | 522 |
| Ráðgevandi toymi (rakstrarjáttan) | 700 | 444 | 256 |
| Serforsorg (rakstrarjáttan) | 140.484 | 137.496 | 2.988 |
| Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 13.850 | 3.960 | 9.890 |
| Lán til ellis- og røktarheim í Vági (løgujáttan) | 9.300 | 3.527 | 5.773 |
| Eldrasambýli (løgujáttan) | 10.450 | 2.705 | 7.745 |
| Serflutningsskipan landsins | 947 | 812 | 135 |
| Sjóndepilin (rakstrarjáttan) | 5.937 | 5.699 | 238 |
| Umsorganararbeiði | 6.806 | 6.270 | 536 |
| Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan) | 280 | 145 | 135 |

### 8.2.1 **Viðlíkahald** (rakstrarjáttan) 8.11.1.8.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.574 t.kr. Minninýtslan er 1.844 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð fíggjarlógin 2008 kunngjørd so seint í árinum, at játtanarskriv til stovnar, um endaliga býtið av viðlíkahaldskontuni, ikki fór avstað fyrr enn í august 2008.

Størsti partur av játtanini varð latin Nærverkinum at umsita. Nærverkið hevði fingið umsóknir frá stovnum um størri viðlíkahaldsarbeiði, m.a. at skifta tekjur. Hesi arbeiði kundu ikki fara ígongd, bæði tí, at so langt var liðið út á árið, og tí at handverkararnir høvdu tikið annað arbeiði framum.

### 8.2.2 **KT-heildarskipan til Almannastovuna** (rakstrarjáttan) 8.21.1.06.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.200 t.kr. Minninýtslan er 839 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 400 t.kr. av seinkingum í arbeiðinum.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

### 8.2.3 **Barnaískoyti** (lógarbundin játtan) 8.21.3.06.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Minninýtslan er 522 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 700 t.kr. av tí at færri umsóknir vóru komnar inn, enn roknað var við.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið 178 t.kr., av tí at nakrar umsóknir vórðu játtaðar, og peningurin goldin út seinast í árinum.

### 8.2.4 **Ráðgevandi toymi** (rakstrarjáttan) 8.21.3.18.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Minninýtslan er 256 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur virksemið verið minni, enn upprunaliga var mett.

### 8.2.5 **Serforsorg** (rakstrarjáttan) 8.21.6.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 140,5 mió.kr. Minninýtslan er 3 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 2 mió.kr. og at flyta peningin til høvuðskontu 8.21.6.04. "Eldrarøkt", av tí at ætlanin við sambýli til brúkarar, sum skuldu koma frá skúlatilboðnum Rásini, varð seinkað.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hevði eykajáttanin verið gingin á møti, hevði minninýtslan verið umleið 1 mió.kr. Ein onnur orsøk til minninýtsluna er, at ein partur av játtanini varð settur av til tilboð í Klaksvík til børn við autismu. Henda ætlan var ikki klár at seta í verk í 2008.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Trivnaðartænastan | 94.929 | 92.218 | 2.711 |
| 21. Stovnsuppihald o.a. í Danmark | 20.350 | 20.036 | 314 |
| 22. Endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | 1.313 | 1.200 | 113 |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 50 | 29 | 21 |
| 24. Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk | 75 | 20 | 55 |
| 26. Deildin fyri sinnisveik | 19.995 | 20.206 | -211 |
| 27. Heim fyri heilaskadd | 3.772 | 3.787 | -15 |
| **Tilsamans** | **140.484** | **137.496** | **2.988** |

### 8.2.6 **Bústovnar o.a.** (løgujáttan) 8.21.6.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 13,9 mió.kr. Minninýtslan er 9,9 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað til:

a) Sambýli í Klaksvík fyri autistar,
b) Sambýli í Tórshavn til sinnisveik,
c) Økisdepil í Vági til sinnisveik, og
d) Umvælingar av verandi stovnum.

Ad a) Sambýlið í Klaksvík fyri autistar

Í 2007 vórðu eini hús í Klaksvík keypt fyri 5 mió.kr. Játtanin varð fingin til vega í eykajáttanarlógini mars 2007-5.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldu 2 mió.kr. verða nýttar til at gera húsini klár, 1 mió.kr. í 2007 og 1 mió.kr. í 2008.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 370 t.kr. nýttar í 2007 og 180 t.kr. í 2008.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landsverk mett, at umbyggingin verður liðug í hesum fíggjarárinum. Almannamálaráðið væntar tí, at húsini verða tikin í nýtslu fyrsta ársfjórðingi 2010.

Ad b) Sambýlið í Tórshavn til sinnisveik

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 894 t.kr. nýttar í 2008.

Sambært Ll. nr. 23/2008 "um bygging av sambýli í Tórshavn til sinnisveik" kunnu útreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 16,2 mió.kr.

Landsstýrismaðurin kunnaði í juni 2008 um, at hann fekk tilmæli frá bygginevndini seinast í 2008, har mælt varð til at fara undir eina verkætlan, sum skuldi útvega 6 íbúðir og felagsøki til 16 íbúðir.

Landsstýrismaðurin hevur ikki tikið undir við tilmælinum frá bygginevndini, av tí at byggingin er ov kostnaðarmikil, men hann hevur gjørt av, at fara undir at kanna møguleikarnar fyri alternativari bygging. Ein ætlan verður væntandi klár seinni í 2009.

Ad c) Økisdepil í Vági til sinnisveik

Sambært Búskaparskipan Landsins eru nýttar 1,7 mió.kr. í 2008.

Sambært Ll. nr. 24/2008 "um bygging av økisdepli í Vági til sinnisveik" kunnu útreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 24,8 mió.kr.

6. mars 2009 legði landsstýrismaðurin fram uppskot um at broyta upphæddina til 32,6 mió.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru á hesari høvuðskontu bókaðar 6,4 mió.kr. í løguútreiðslum og 7 mió.kr. í inntøkum, ið viðvíkja Ellis- og Røktarheiminum í Vági.

Inntøkurnar eru studningslán sambært Ll. nr. 166/2005 "um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli" 3,5 mió.kr., og lán sambært Ll. nr. 118/2006 "um lán til bygging av ellis- og røktarheimi í Vági" 3,5 mió.kr.

Á StRk "2192: onnur søla av tænastum, leigu og langtíðarleigu, almen." eru bókaðar 870 t.kr. í útreiðslum. Sambært landsstýrismanninum er tað ein bókingarfeilur, sum tó ikki gevur nakra skeiva mynd av samlaðu støðuni.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hví útreiðslur og inntøkur viðvíkjandi Ellis- og Røktarheiminum í Vági eru bókaðar á hesari høvuðskontu.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at síðani 2007 hevur Landsverk umsitið játtanina fyri Almannamálaráðið. Høvuðskontan snúði seg um sambýlini í Klaksvík, Tórshavn og økisdepilin í Vági.

Tá farið varð undir at byggja ellis- og røktarheim í Vági valdi Landsverk at leggja verkætlanina undir somu høvuðskontu, við tað at ellis- og røktarheimið í Vági hevði fleiri viðurskifti felags við økisdepilin til sinnisveik.

Sambært landsstýrismanninum hevur mannagongdin verið:

*at* allar útreiðslur hava verið bókaðar á ta verkætlan, sum útreiðslurnar viðvíkja,

*at* rokning síðani er send tí, sum skal rinda hana (í hesum førinum Almannamálaráðið vegna høvuðskonturnar “Lán til ellis- og røktarheim í Vági” og “Eldrasambýli”).

At verkætlanin hevur ligið undir høvuðskontuni Bústovnar hevur sambært landsstýrismanninum ikki havt ávirkan á samlaðu upphæddina, við tað at rokning hevur verið send til avvarðandi verkætlan.

Ad d) Umvælingar av verandi stovnum

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 1,8 mió.kr. nýttar til Bústovnin í Børkugøtu, Tórshavn.

### 8.2.7 Lán til ellis- og røktarheim í Vági (løgujáttan) 8.21.6.14.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9,3 mió.kr. Minninýtslan er 5,8 mió.kr.

Sambært Ll. nr. 118/2006 “um lán til bygging av ellis- og røktarheimi í Vági” er heimilað landsstýrismanninum at veita lán, í mesta lagi 26,5 mió.kr., til kommunurnar í Suðuroy.

Sambært landsroknskapinum eru fyribils nýttar 4,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er verkætlanin í Vági av ymiskum orsøkum seinkað, og er ikki rættuliga farin í gongd enn.

Á heysti í 2008 komu tilboð inn at byggja ellis- og røktarheimið. Tað vísti seg, at tilboðini, sum komu inn, vóru væl hægri enn metingarnar, sum gjørdar vórðu frammanundan. Tí varð farið undir at broyta løgtingslógina.

30. apríl 2009 samtykti Løgtingið “løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lán til bygging av ellis- og røktarheimi í Vági”. Heimild var nú at veita kommununum í sunnaru helvt í Suðuroynni lán fyri í mesta lagi 35,19 mió.kr. til at byggja ellis- og røktarheim í Vági.

### 8.2.8 Eldrasambýli (løgujáttan) 8.21.6.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10,5 mió.kr. Minninýtslan er 7,7 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 6,4 mió.kr. vísandi til, at nakrar verkætlanir, sum tilsagnir vórðu givnar til í mai 2006, enn ikki vóru farnar ígongd, og aðrar verkætlanir, sum vóru í gerð, vórðu bíligari, enn roknað var við.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum eru verkætlanirnar “á Boðanesi í Tórshavn”, “røktarheim í Vestmanna” og “eldrasambýli í Svínoy” ikki farnar ígongd.

### 8.2.9 Serflutningsskipan landsins 8.21.6.17.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 947 t.kr. Minninýtslan er 135 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð játtanin til Serflutningsskipanina hækkað av tí at lagt varð upp fyri, at virksemið skuldi økjast vegna kommunusamanlegging. Enn er tó onki hent.

### 8.2.10 Sjóndepilin (rakstrarjáttan) 8.21.6.20.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.937 t.kr. Minninýtslan er 238 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fór virksemið á Traðabrekku ikki rættiliga í gongd fyrr enn í 2009. Somuleiðis vórðu fólk ikki sett í starv fyrr enn seinast í 2008, ella hava arbeitt niðursetta tíð.

### 8.2.11 Umsorganararbeiði 8.21.8.08.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.806 t.kr. Minninýtslan er 536 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum lat ein kommuna ikki roknskap fyri umsorganararbeiði inn fyri 2007, og fekk tískil ikki útgjald í 2008. Harumframt hava tvær kommunur fingið minni goldið út í 2008 enn játtað, av tí at óbrúktur stuðul í 2007, ikki var goldin aftur.

### 8.2.12 Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan) 8.21.9.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 280 t.kr. Minninýtslan er 135 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru ongar lønarútreiðslur í 2008, av tí at námsfrøðingarnir tóku útbúgvingina sum fjarlestur.

# 9 Innlendismál

## 9.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) | 12.119 | 12.339 | 220 |
| Søla av landsins ognum | -10.000 | - | 10.000 |
| Akstovan (rakstrarjáttan) | -1.100 | 196 | 1.296 |
| Hin føroyski Happadrátturin (lógarbundin játtan) | -913 | -544 | 369 |

### 9.1.1 Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) 14.11.1.28.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12.119 t.kr. Meirnýtslan er 220 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 11.963 | 12.339 | 376 |
| 22. Arbeiðsmarknaðarráð | 156 | - | -156 |
| **Tilsamans** | **12.119** | **12.339** | **220** |

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan, at skrivstovuútgerð er keypt til Útlendingastovuna.

### 9.1.2 Søla av landsins ognum (løgujáttan) 6.11.1.47.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 10 mió.kr. Ongin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaðan søluprís fyri oljutangarnar, sum landið eigur í Sørvági og í Søldarfirði, og sum í fíggjarlógunum fyri 2006, 2007 og aftur í 2008 varð mettur til 10 mió.kr.

Í fíggjarlógini 2009 er ongin játtan. Sambært viðmerkingunum er ongin ætlan um at selja oljutangarnar í 2009.

### 9.1.3 Akstovan (rakstrarjáttan) 6.38.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 13.480 t.kr. til inntøkur og 12.380 t.kr. til útreiðslur. Meirnýtslan er 1.296 t.kr. netto.

t.kr.

| Akstovan (rakstrarjáttan) 6.38.4.01. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -13.480 | -12.937 | 543 |
| Útreiðslur | 12.380 | 13.133 | 753 |
| **Tilsamans** | **-1.100** | **196** | **1.296** |

Sambært landsstýrismanninum steðgaði sølan av bilum upp seinasta ársfjórðing í 2008. Tað gjørdi, at Akstovan fekk at kalla ongar skrásetingarinntøkur hetta tíðarskeiðið.

Harafturat gjørdust útreiðslurnar til løgfrøðiligar tænastur og kt- tænastur nakað hægri, enn roknað varð við. Hetta tí at arbeiðið við at broyta ferðslulógina, og verkætlanin at menna eina sjálvavgreiðsluskipan á netinum, gjørdist meira umfatandi, enn roknað var við.

### 9.1.4 **Hin føroyski Happadrátturin** (lógarbundin játtan) 14.14.3.01.

Í fíggjarlógini er ein nettoinntøkujáttan 913 t.kr. Minniinntøkan er 369 t.kr.

Landsstýrismaðurin ger vart við, at Ll. nr. 49/1950 “um føroyskan happadrátt” verður sett úr gildi 1. januar 2011.

## 9.2 Minninýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Nýggir landsvegir (løgujáttan) | 31.300 | 30.246 | 1.054 |
| Stuðul til infrakervið á útoyggjum | 3.100 | 1.413 | 1.687 |
| Sandoyartunnil (løgujáttan) | 6.000 | 1.595 | 4.405 |
| Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting (rakstrarjáttan) | 913 | 544 | 369 |
| Spilloljureinsing | 3.500 | 1.323 | 2.177 |
| Umhvørvisstovan | 2.500 | 2.364 | 136 |

### 9.2.1 **Nýggir landsvegir** (løgujáttan) 6.38.1.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 31,3 mió.kr. Minninýtslan er 1,1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at fíggjarlógin kom so seint í gildi í 2008, at tað ikki eydnaðist at nýta játtanina til fulnar.

### 9.2.2 **Stuðul til infrakervið á útoyggjum** 6.38.1.18.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.100 t.kr. Minninýtslan er 1.687 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 900 t.kr., av tí at tørvur var ikki á allari játtanini í 2008.

Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum stóðst minninýtslun av:

- *at* tað vóru ov fáar umsóknir, sum kundu haldast at lúka treytirnar í kunngerð nr. 10 frá 7. mars 2006 um stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggj.
- *at* 500 t.kr. vóru játtaðar til tvær verkætlanir í Mykinesi, men tær vórðu ikki framdar:
  - a) Tøming av bátahyli. Varð ikki framt, tí fyri veður ber tað ikki til at fara undir slíkt arbeiði, tá ið komið er út á árið.
  - b) Kanning av alternativum tyrlupalli. Fyri at finna út av, hvar ein tyrlupallur møguliga skuldi vera, var neyðugt at fáa upplýsingar frá Atlantsflog. Upplýsingarnar komu so seint, at tað bar ikki til at arbeiða víðari við málinum.

### 9.2.3 **Sandoyartunnil** (løgujáttan) 6.38.2.23.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.000 t.kr. Minninýtslan er 4.405 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru gjørdar kjarnuboringar, jarðfrøðiligar-, seismiskar-, og akustiskar kanningar.

Eftir ætlan skuldu vatnrættar kjarnuboringar eisini verða gjørdar. Slíkt arbeiði verður bert gjørt av heilt fáum arbeiðstakarum í heiminum. Tað eydnaðist at fáa samband við eina fyritøku, sum ger tílíkt arbeiði, men tá var so langt liðið út á árið, at eingin møguleiki var at fremja boringarnar. Kanningarnar taka langa tíð, og mugu gerast í besta veðri.

### 9.2.4 Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting (rakstrarjáttan) 14.14.3.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 913 t.kr. Minninýtslan er 369 t.kr.

Landsstýrismaðurin ger vart við, at Ll. nr. 49/1950 "um føroyskan happadrátt" verður sett úr gildi 1. januar 2011.

### 9.2.5 Spilloljureinsing 14.30.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.500 t.kr. Minninýtslan er 2.177 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru tvær rokningar, 2,2 mió.kr., frá IRF, sum hoyra heima í 2008, av misgáum bókaðar í roknskapinum 2009. Onnur rokningin frá 10. desember 2008, 838 t.kr., og hin frá 16. februar 2009, 1.339 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at smb. § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini, kann peningur verða ávístur í tíðarskeiðinum fram til 1. apríl, eftir at fíggjarárið er endað. Útreiðslurnar vórðu bókaðar í mars 2009, men kundu ikki leysgevast, av tí at Gjaldstovan skal geva loyvi at leysgeva upphæddir, ið eru av ávísari stødd.

Gjaldstovan hevur í august 2009 víst á, at § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini ikki neyðturviliga merkir, at rokningar fyri farna árið skulu kunna ávísast fram til 1. apríl. Gjaldstovan kunnaði 3. januar 2009 stovnarnar um, at 19. februar 2009 var seinasti dagur, ið stovnar kundu bóka á fíggjarárið 2008.

Sambært Gjaldstovuni var veruligi trupulleikin, at Innlendismálaráðið 3. mars 2009 royndi at bóka á 2008, hóast ráðið væl og virðiliga var kunnað um tíðarfreistirnar.

### 9.2.6 Umhvørvisstovan (løgujáttan) 14.37.4.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.500 t.kr. Minninýtslan er 136 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2008-2 varð skotið upp at lækka játtanina 800 t.kr., tí játtanin til elektróniska skipan til Landsfólkayvirlitið fór ikki øll at verða nýtt í 2008. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

# 10 UTTANRÍKISMÁL

## 10.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Uttanríkistænastan (rakstrarjáttan) | 22.849 | 23.212 | 362 |
| SamVit (rakstrarjáttan) | 14.700 | 14.886 | 186 |

### 10.1.1 Uttanríkistænastan (rakstrarjáttan) 16.11.1.54.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 22.849 t.kr. Meirnýtslan er 362 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Uttanríkisráðið | 8.181 | 8.385 | 204 |
| 21. Sendistova Føroya til London | 3.233 | 2.828 | -405 |
| 22. Sendistova Føroya til Keypmannahavnar | 3.285 | 3.241 | -44 |
| 23. Sendistova Føroya til Evropasamveldið | 5.120 | 5.310 | 190 |
| 24. Sendistova Føroya til Reykjavíkar | 3.030 | 3.447 | 417 |
| **Tilsamans** | **22.849** | **23.211** | **362** |

Undirkonta 20. "Uttanríkisráðið"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 204 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan "keyp av vørum og tænastum" hjá Uttanríkisráðnum. Meirnýtslan var tilætlað og varð í oktober 2008 samskipað við sendistovuna í London, sum miðaði eftir minninýtslu.

Undirkonta 21. "Sendistova Føroya til London"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 405 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð avgerðin at seta nýtt starvsfólk á sendistovuna í London útsett.

Undirkonta 23. "Sendistova Føroya til Evropasamveldið"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 190 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru nýggj skrivstovuhølir innrættað hjá sendistovuni í Brússel. Meirnýtslan var tilætlað, og varð í oktober 2008 samskipað við sendistovuna í London, sum miðaði eftir minninýtslu,

Undirkonta 24. "Sendistova Føroya til Reykjavíkar"

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 417 t.kr.

Uttanríkisráðið gjørdi seint í desember íløgu í videofundarútgerð, tí ráðið helt, at peningur var tøkur. Sambært landsstýrismanninum hevði Uttanríkisráðið av misgáum

ikki tikið hædd fyri, at avrokningin frá danska "Udenrigsministeriet" fyri løn og útiviðbót til sendifólkini verður roknað afturút.

Rokningin frá "Udenrigsministeriet" fyri 4. ársfjórðing 2008, 254 t.kr., kom síðst í januar 2009.

Landsstýrismaðurin vísir harumframt á, at síðani Sendistovan í Reykjavík varð sett á stovn í 2007, hevur óvissa valdað um, hvussu nógv hon skal gjalda til "Udenrigs-ministeriet". Tað er fyrstu ferð, at Føroyar hava havt eina sendistovu leysa av danska kervinum.

Í januar 2009 kom loksins rokningin frá "Udenrigsministeriet" stór 278 t.kr. Í ætlanini fyri 2008 var mett, at hesin kostnaður fór at vera um 100 t.kr.

### 10.1.2 **SamVit** (rakstrarjáttan) 6.37.1.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14.700 t.kr. Meirnýtslan er 186 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.700 | 14.019 | 319 |
| 21. Marknaðarføring | 1.000 | 839 | -161 |
| 40. Verkætlanir | - | 28 | 28 |
| **Tilsamans** | **14.700** | **14.886** | **186** |

SamVit varð 30. september 2008 lagt undir málsøkið hjá landsstýrismanninum í uttanríkismálum.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at SamVit ikki fekk endurgoldið lønarútreiðslur frá Barsilsskipanini í sambandi við eitt barnsburðarfarloyvi tí SamVit hevði misskilt umsóknarfreistina.

# 11 Samlað yvirlit meir-/minninýtsla

Yvirlitið vísir meir-/minninýtslu á øllum høvuðskontum í landsroknskapinum. Høvuðskontur, har eingin meir- ella minninýtsla er, eru ikki tiknar við.

Í frágreiðingin frammanfyri er greitt frá um tey mest týðandi frávikini.

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| **Løgmansfyrisitingin** | | | | |
| Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) | 7.761 | 7.774 | 13 | |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 500 | 506 | 6 | |
| Umbygging í Tinganesi (løgujáttan) | 1.000 | 806 | | 194 |
| Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) | 6.480 | 7.906 | 1.426 | |
| **Fíggjarmál** | | | | |
| Fíggjarmálaráðið (rakstrarjáttan) | 9.160 | 8.834 | | 326 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 377 | 380 | 3 | |
| Flyting av fíggjar-og búskaparstovnum landsins (løgujáttan) | 1.500 | 1.481 | | 19 |
| Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan) | 711 | 378 | | 333 |
| Søla av partabrøvum í P/F Elektron | -5.000 | - | 5.000 | |
| TAKS (rakstrarjáttan) | 65.063 | 66.325 | 1.262 | |
| Føroya gjaldstova (rakstrarjáttan) | 23.419 | 23.416 | | 3 |
| Nýggj fíggjarstýring (rakstrarjáttan) | 1.700 | 1.714 | 14 | |
| Búskaparráðið (rakstrarjáttan) | 763 | 500 | | 263 |
| Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan) | 1.706 | 1.191 | | 515 |
| Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) | 9.575 | 9.627 | 52 | |
| Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan) | 18.950 | 19.070 | 120 | |
| Eftirlønir (lógarbundin játtan) | 450 | 479 | 29 | |
| Danskar eftirlønir (lógarbundin játtan) | 1.400 | 1.512 | 112 | |
| Eftirløn landsstýrismanna (lógarbundin játtan) | 1.150 | 1.340 | 190 | |
| Lønarforskot | - | -5 | | 5 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) | 11.800 | 12.077 | 277 | |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) | 14.500 | 17.679 | 3.179 | |
| Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) | 500 | 24 | | 476 |
| Rentustudningur til húsabygging (lógarbundin játtan) | 1.650 | 1.616 | | 34 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) | 101.000 | 112.457 | 11.457 | |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin játtan) | 15.000 | 8.929 | | 6.071 |
| Lán til Húsalánsgrunnin | -1.667 | -1.659 | 8 | |
| Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) | 40.300 | 43.757 | 3.457 | |
| FAS-endurgjald (lógarbundin játtan) | 53.600 | 51.645 | | 1.955 |
| KT-fyrisiting (rakstrarjáttan) | 5.000 | 5.472 | 472 | |
| **Fiskivinnumál** | | | | |
| Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan) | 16.051 | 14.327 | | 1.724 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 600 | 871 | 271 | |
| Granskingarætlanir (rakstrarjáttan) | 3.748 | 3.499 | | 249 |
| Tilbúgvingarsamskipanin (rakstrarjáttan) | 17.815 | 18.027 | 212 | |
| Tilbúgvingarætlan (løgujáttan) | 2.000 | 2.087 | 87 | |
| Jarðfeingi (rakstrarjáttan) | 27.317 | 27.322 | 5 | |
| Søla av seismiskum kanningarúrslitum | -150 | -159 | | 9 |
| Almennar royndir og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 2.698 | 2.680 | | 18 |
| Innsavnan av ull og skinnum | 750 | 517 | | 233 |
| Búnaðarstovan (rakstrarjáttan) | 2.880 | 2.807 | | 73 |
| Landbúnaðarstuðul | 12.560 | 12.557 | | 3 |
| Almenn jørð, søla (løgujáttan) | 0 | 52 | 52 | |
| Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) | 450 | 513 | 63 | |
| Upplýsing um grind (rakstrarjáttan) | 325 | 472 | 147 | |
| Hvalagransking og hvalateljing v.m. (rakstrarjáttan) | 950 | 968 | 18 | |
| Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan) | 2.881 | 2.422 | | 459 |
| Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) | 46.246 | 43.360 | | 2.886 |
| Fiskirannsóknarstovan (rakstrarjáttan) | 12.176 | 12.900 | 724 | |
| Magnus Heinason (rakstrarjáttan) | 10.395 | 11.932 | 1.537 | |
| Nýtt havrannsóknarskip (løgujáttan) | 2.900 | 1.710 | | 1.190 |
| Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan) | 5.000 | 4.937 | | 63 |
| Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) | 18.600 | 22.359 | 3.759 | |
| Sjúkratrygd (lógarbundin játtan) | 7.000 | 5.125 | | 1.875 |
| Heilsukanningar av sjófólki (lógarbundin játtan) | 900 | 856 | | 44 |
| Fiskivinnumenning á landi | 1.000 | 1.123 | 123 | |
| Flutningsstuðul (lógarbundin játtan) | 4.000 | 3.914 | | 86 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Útlán | -2.600 | 129 | 2.729 | |
| Effektivar veðhaldsútreiðslur | -1.000 | -41 | 959 | |
| Skipaeftirlitið (rakstrarjáttan) | 8.714 | 8.713 | | 1 |
| Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan) | 2.573 | 2.644 | 71 | |
| **Vinnumál** | | | | |
| Vinnumálaráðið (rakstrarjáttan) | 10.286 | 10.287 | 1 | |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 400 | 237 | | 163 |
| Javnstøðunevndin (rakstrarjáttan) | 450 | 460 | 10 | |
| Kvinnuluttøka í politikki (rakstrarjáttan) | 400 | 409 | 9 | |
| Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan) | 364 | 373 | 9 | |
| Djóralæknatænastur (rakstrarjáttan) | 1.100 | 903 | | 197 |
| Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan) | 5.360 | 5.395 | 35 | |
| Sáttmálaeftirlit (rakstrarjáttan) | 75 | 57 | | 18 |
| Loyvisnevndin (rakstrarjáttan) | 150 | 106 | | 44 |
| El-nevndin (rakstrarjáttan) | 240 | 273 | 33 | |
| Kappingarráðið (rakstrarjáttan) | 2.430 | 2.044 | | 386 |
| Skráseting Føroya (rakstrarjáttan) | 1.000 | 1.050 | 50 | |
| Endurgjald til skipasmíð | 10.000 | 8.415 | | 1.585 |
| Rúsdrekkasøla landsins (landsfyritøka) | -11.848 | -11.733 | 115 | |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan (rakstrarjáttan) | 17.510 | 17.599 | 89 | |
| Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (løgujáttan) | 3.200 | 5.330 | 2.130 | |
| Lánsafturgjald | -2.500 | -896 | 1.604 | |
| Partabrøv, ymsi viðurskifti | -6.600 | -462 | 6.138 | |
| Vága floghavn (løgujáttan) | 4.600 | - | | 4.600 |
| Flogferðsla (løgujáttan) | 2.000 | 179 | | 1.821 |
| Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) | 4.400 | 4.392 | | 8 |
| Semingsmannaskipanin (rakstrarjáttan) | 300 | 191 | | 109 |
| Arbeiðseftirlitið (rakstrarjáttan) | 4.706 | 4.644 | | 62 |
| Barsilsskipan (lógarbundin játtan) | 79.600 | 83.077 | 3.477 | |
| Umsiting av barsilsskipan (rakstrarjáttan) | 2.000 | 1.798 | | 202 |
| Strandfaraskip landsins (landsfyritøka) | 136.741 | 143.595 | 6.854 | |
| Strandfaraskip landsins (løgujáttan) | 3.500 | 72 | | 3.428 |
| **Mentamál** | | | | |
| Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) | 16.969 | 16.868 | | 101 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 5.865 | 6.062 | 197 | |
| Stuðulsstovnurin (rakstrarjáttan) | 3.606 | 3.622 | 16 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Ymsar felagsútreiðslur (rakstrarjáttan) | 3.724 | 3.376 | | 348 |
| Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð (rakstrarjáttan) | 5.209 | 5.224 | 15 | |
| Útgerð til yrkisskúlar og hægri útbúgvingar (rakstrarjáttan) | 2.958 | 2.921 | | 37 |
| KT í skúlaverkinum (rakstrarjáttan) | 2.919 | 2.901 | | 18 |
| Skúlabókagerð (rakstrarjáttan) | 620 | 625 | 5 | |
| Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan) | 6.854 | 8.407 | 1.553 | |
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 6.751 | 6.893 | 142 | |
| Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan) | 546 | 653 | 107 | |
| Næmingaheim | 900 | 483 | | 417 |
| Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 258.229 | 248.914 | | 9.315 |
| Sernámsdepilin (rakstrarjáttan) | 57.285 | 57.303 | 18 | |
| Stuðul til fólkaskúlar | 5.259 | 5.439 | 180 | |
| Skúlatilboð til ung við breki (rakstrarjáttan) | 2.386 | 2.355 | | 31 |
| Skúlin á Trøðni (løgujáttan) | 1.500 | 1.573 | 73 | |
| Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) | 154.522 | 154.559 | 37 | |
| Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | 52.000 | 61.588 | 9.588 | |
| Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) | 10.100 | 11.332 | 1.232 | |
| Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) | 21.500 | 23.932 | 2.432 | |
| Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) | 2.000 | 1.114 | | 886 |
| Studningur til lærupláss (lógarbundin játtan) | 12.000 | 13.511 | 1.511 | |
| Gjald fyri lærusáttmálar o.a. | -1.190 | -954 | 236 | |
| Ferðaendurgjald til lærupláss (lógarbundin játtan) | 1.200 | 1.229 | 29 | |
| Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 4.000 | 4.003 | 3 | |
| Føroya fólkaháskúli | 2.547 | 2.384 | | 163 |
| Húsarhaldsskúlar | 2.071 | 2.029 | | 42 |
| Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan) | 6.216 | 5.396 | | 820 |
| Musikkskúlar (rakstrarjáttan) | 10.596 | 10.967 | 371 | |
| Klaksvíkar sjómansskúli (løgujáttan) | 700 | 809 | 109 | |
| Klaksvíkar sjómansskúli (rakstrarjáttan) | 3.032 | 2.992 | | 40 |
| Vinnuháskúlin (rakstrarjáttan) | 19.038 | 19.081 | 43 | |
| Almanna- og heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan) | 12.167 | 13.420 | 1.253 | |
| Læraraskúlin (rakstrarjáttan) | 19.960 | 19.775 | | 185 |
| Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan) | 25.163 | 25.571 | 408 | |
| Biofar (rakstrarjáttan) | 1.598 | 1.594 | | 4 |
| Granskingarráð Føroya (rakstrarjáttan) | 2.413 | 2.414 | 1 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) | 1.214 | 1.476 | 262 | |
| Lestrarstudningur (lógarbundin játtan) | 83.311 | 83.417 | 106 | |
| Tiltøk fyri børn og ung | - | -89 | | 89 |
| Málnevndin (rakstrarjáttan) | 411 | 392 | | 19 |
| Orðabókagerð | 940 | 977 | 37 | |
| Ymiskir studningar | 2.698 | 2.671 | | 27 |
| Filmseftirlitið (rakstrarjáttan) | 351 | 331 | | 20 |
| Ungdóms- og bygdarhús | 660 | - | | 660 |
| Tónleikur og sangur | 1.800 | 1.709 | | 91 |
| Umsiting av Mentanargrunninum (rakstrarjáttan) | 362 | 424 | 62 | |
| Leiklist (rakstrarjáttan) | 4.960 | 4.889 | | 71 |
| Heiðursgávur til mentafólk | 500 | 427 | | 73 |
| Bókasøvn (rakstrarjáttan) | 12.752 | 12.705 | | 47 |
| Føroya landsskjalasavn (rakstrarjáttan) | 2.777 | 2.854 | 77 | |
| Føroya fornminnissavn (rakstrarjáttan) | 7.165 | 7.162 | | 3 |
| Bygdasøvn | 3.289 | 3.054 | | 235 |
| Friðað hús og fornminni (rakstrarjáttan) | 1.277 | 1.275 | | 2 |
| Menning av mentan og mentanararvi (rakstrarjáttan) | 345 | 342 | | 3 |
| Listasøvn (rakstrarjáttan) | 2.440 | 2.436 | | 4 |
| Kirkjubømúrurin (løgujáttan) | 1.000 | 749 | | 251 |
| Kringvarp Føroya (landsfyritøka) | - | 3.142 | 3.142 | |
| Lánsafturgjald | -100 | - | 100 | |
| Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan) | 4.500 | 4.528 | 28 | |
| **Heilsumál** | | | | |
| Almanna- og Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) | 25.521 | 25.406 | | 115 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 5.574 | 3.730 | | 1.844 |
| Vísindasiðseminevndin (rakstrarjáttan) | 152 | 59 | | 93 |
| Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 2.943 | 2.994 | 51 | |
| Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu | 500 | 500 | | |
| Koppsetingar (lógarbundin játtan) | 2.880 | 2.447 | | 433 |
| Upplýsing um gitnaðarfyribyrging (lógarbundin játtan) | 400 | 412 | 12 | |
| Heilsukanningar av barnakonum (lógarbundin játtan) | 806 | 709 | | 97 |
| Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) | 1.191 | 699 | | 492 |
| Sjúkrakassar | 34.900 | 35.475 | 575 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 10.844 | 11.423 | 579 | |
| Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) | 3.199 | 4.480 | 1.281 | |
| Apoteksverkið (Landsfyritøka) | - | 1.153 | 1.153 | |
| Apoteksverkið (løgujáttan) | 9.800 | 9.815 | 15 | |
| Ílegusavnið (rakstrarjáttan) | 2.566 | 3.019 | 453 | |
| Heilsuverkið (rakstrarjáttan) | 700 | - | | 700 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 373.462 | 377.261 | 3.799 | |
| Medicoteknisk tól (løgujáttan) | 8.000 | 7.934 | | 66 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 34.700 | 34.742 | 42 | |
| Klaksvíkar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 57.280 | 57.545 | 265 | |
| Klaksvíkar sjúkrahús (løgujáttan) | 1.000 | 998 | | 2 |
| Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 44.018 | 44.211 | 193 | |
| Suðuroyar sjúkrahús (løgujáttan) | 1.700 | 1.690 | | 10 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 116.991 | 134.021 | 17.030 | |
| Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (rakstrarjáttan) | 1.545 | 1.551 | 6 | |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 4.931 | 4.762 | | 169 |
| Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (rakstrarjáttan) | 4.937 | 4.920 | | 17 |
| Lánsafturgjald | -79 | -275 | | 196 |
| **Almannamál** | | | | |
| Almannastovan (rakstrarjáttan) | 40.203 | 40.237 | 34 | |
| KT-heildarskipan til Almannastovuna (rakstrarjáttan) | 3.200 | 2.361 | | 839 |
| Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan) | 7.096 | 7.089 | | 7 |
| Alv-skúlin (rakstrarjáttan) | 3.253 | 3.216 | | 37 |
| Studningur annars | 200 | 155 | | 45 |
| Barnavernd (lógarbundin játtan) | 4.000 | 6.018 | 2.018 | |
| Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 1.150 | 862 | | 288 |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 7.950 | 8.900 | 950 | |
| Barnaískoyti (lógarbundin játtan) | 2.000 | 1.478 | | 522 |
| Børn og ung (rakstrarjáttan) | 43.173 | 43.107 | | 66 |
| Barnatænastan (rakstrarjáttan) | 11.036 | 11.178 | 142 | |
| Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) | 850 | 750 | | 100 |
| Ráðgevandi toymi (rakstrarjáttan) | 700 | 444 | | 256 |
| Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) | 58.430 | 58.895 | 465 | |
| Serforsorg (rakstrarjáttan) | 140.484 | 137.496 | | 2.988 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 13.850 | 3.960 | | 9.890 |
| Eldrarøkt (rakstrarjáttan) | 314.510 | 315.305 | 795 | |
| Nærverkið, Meginskrivstovan (rakstrarjáttan) | 6.890 | 6.849 | | 41 |
| Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) | 10.900 | 13.943 | 3.043 | |
| Stuðulstænastan (rakstrarjáttan) | 21.430 | 21.753 | 323 | |
| Vardar íbúðir, rakstrarstudningur | 121 | 120 | | 1 |
| Lán til ellis- og røktarheim í Vági | 9.300 | 3.527 | | 5.773 |
| Eldrasambýli (løgujáttan) | 10.450 | 2.705 | | 7.745 |
| Serflutningsskipan landsins | 947 | 812 | | 135 |
| Sjóndepilin (rakstrarjáttan) | 5.937 | 5.699 | | 238 |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 135.950 | 150.014 | 14.064 | |
| Fólkapensjón (lógarbundin játtan) | 386.400 | 392.635 | 6.235 | |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 228.350 | 237.820 | 9.470 | |
| Umsorgararbeiði | 6.806 | 6.270 | | 536 |
| Einkjubarnastyrkur (lógarbundin játtan) | 2.100 | 2.069 | | 31 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan) | 24.000 | 24.600 | 600 | |
| Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan) | 280 | 145 | | 135 |
| **Innlendismál** | | | | |
| Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) | 12.119 | 12.339 | 220 | |
| Ymsar útreiðslur (rakstrarjáttan) | 2.594 | 2.146 | | 448 |
| Søla av landsins ognum (løgujáttan) | -10.000 | - | 10.000 | |
| Landsins ognir (rakstrarjáttan) | -1.400 | -1.609 | | 209 |
| Føroya kærustovnur (rakstrarjáttan) | 4.846 | 4.789 | | 57 |
| Dátueftirlitið (rakstrarjáttan) | 1.890 | 1.858 | | 32 |
| Hin føroyski Happadrátturin (lógarbundin játtan) | -913 | -544 | 369 | |
| Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting (rakstrarjáttan) | 913 | 544 | | 369 |
| Stuðul til umhvørvisverndartiltøk | 1.710 | 1.648 | | 62 |
| Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan) | 306 | 311 | 5 | |
| Spilloljureinsing | 3.500 | 1.323 | | 2.177 |
| Lánsafturgjald | -3.200 | -3.213 | | 13 |
| Træplanting | 450 | 441 | | 9 |
| Umhvørvisstovan (rakstrarjáttan) | 24.372 | 24.355 | | 17 |
| Umhvørvisstovan (løgujáttan) | 2.500 | 2.364 | | 136 |
| Landsverk (rakstrarjáttan) | 70.800 | 70.651 | | 149 |
| Nýggir landsvegir (løgujáttan) | 31.300 | 30.246 | | 1.054 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Havnir (løgujáttan) | 1.200 | 1.226 | 26 | |
| Stuðul til infrakervið á útoyggjum | 3.100 | 1.413 | | 1.687 |
| Sandoyartunnil (løgujáttan) | 6.000 | 1.595 | | 4.405 |
| Akstovan (rakstrarjáttan) | -1.100 | 196 | 1.296 | |
| **Uttanríkismál** | | | | |
| Uttanríkistænastan (rakstrarjáttan) | 22.849 | 23.212 | 363 | |
| Norðurlandasamstarv, ráðharraráð (rakstrarjáttan) | 500 | 431 | | 69 |
| Millumtjóða samstarv | 2.800 | 2.728 | | 72 |
| Kappingarsamleiki (rakstrarjáttan) | 750 | 746 | | 4 |
| SamVit (rakstrarjáttan) | 14.700 | 14.886 | 186 | |